# ÁRSFRÁGREIÐING

# 2023

## FØROYA KÆRUSTOVNUR



Ársfrágreiðing 2023 hjá Føroya Kærustovni ©
Sniðgeving og umbróting: AnniJanni
Prent: Føroyaprent

# INNIHALDSYVIRLIT

1/ Inngangur ..... 5
2/ Kærustovnurin ..... 9
3/ Virksemið 2023 ..... 13
4/ Almanna-, familju- og heilsumál ..... 17
5/ Skatta- og avgjaldsmál ..... 29
6/ Lestrarstuðulsmál ..... 35
7/ Lendismál ..... 39
8/ Vinnumál ..... 43
9/ Psykiatrisk sjúklingamál ..... 51
10/ Skuldarumskipanarmál ..... 55
11/ Barnaverndarmál ..... 59
12/ Arbeiðsloysisskipanarmál og Barsilsskipanarmál ..... 71
13/ Tvingsilsnevndin ..... 75

**SKIFTISTÍÐARSKEIÐIÐ, HAR NEVNDIR VERÐA TIKNAR AV OG VIRKISØKIÐ VERÐUR FLUTT TIL FØROYA KÆRUSTOVN, ER NÚ ENDALIGA RUNNIÐ.**

# 1/INNGANGUR

Skiftistíðarskeiðið, har nevndir verða tiknar av og virkisøkið verður flutt til Føroya Kærustovn, er nú endaliga runnið. Høvuðsbarnaverndarnevndin og Psykiatriska sjúklingakærunevndin vórðu tiknar av 1. juli 2023 og virkisøkið varð flutt til Føroya Kærustovn, meðan seinasta nevndin, Tvingsilsnevndin, varð tikin av 1. januar 2024 og virkisøkið varð flutt til Føroya Kærustovn. Hetta merkir, at umskipanin av Føroya Kærustovni, sum varð sett í verk tann 1. januar 2022, er nú endaliga komin á mál.

Skiftistíðin hevur eydnast væl og nýggja skipanin hevur líðandi fingið rótfesti í Føroya Kærustovni. Størstu avbjóðingarnar í skiftistíðini hava verið, at skipa nýggjar arbeiðsgongdir fyri Føroya Kærustovn og hjá einkultu starvsfólkunum, at finna seg til rættis í broyttum leiklutum. Hóast umskipanartilgongdin, har arbeitt hevur verið í tveimum skipanum samstundis, hevur verið krevjandi av bæði leiðslu og starvsfólkum, so verður mett, at umskipanin hevur eydnast sera væl og at Føroya Kærustovnur sum heild stendur sterkari eftir umskipanina.

Meira ítøkiliga kann vísast á, at greitt er, at tað nú er skjótari at avgreiða ávís sløg av málum. Hetta eru m.a. mál um kærufreistir, mál um avgerðarheimildir, áheitanir um uppafturtøku og líknandi mál, sum nú kunnu avgreiðast av einum løgfrøðingi á Kærustovninum, tá talan er um mál, sum eru ivaleys.

Miðal viðgerðartíðirnar eru góðar á flestu økjum hetta árið. Tað er tó ógvuliga ymiskt hvussu leingi tað er at avgreiða ymisk mál. Í allar flestu førum, vera málini avgreidd innan 6 mánaðir eru farnir. Men á skattaøkinum hevur ein serstøða í 2023 havt við sær, at fleiri mál sum í áravís hava verið í bíðistøðu, vegna viðurskifti sum ikki skyldast Føroya Kærustovni, og sum eru endaliga avgreidd í 2023, hava økt munandi um miðal viðgerðartíðina á skattaøkinum.

Ein stórur fyrimunir við nýggju skipanini er, at arbeiði er meiri smidligt, á tann hátt, at mál verða viðgjørd, tá tey eru klár og verða ikki savnaði saman til mánaðarligan fund. Eisini er møguligt at vera liðilig í mun til ásetan av fundi, tá borgarar ynskja at møta og er mangan fundur, har bert eitt mál verður viðgjørt. Hetta ber serliga væl til í málum, har tað bert eru løgfrøðingar á Kærustovninum, sum skulu verða við í viðgerðini. Tá serkøn eisini skulu verða við og fundurin tí eisini skal samskipast í mun til hesi, er neyðugt at vera meiri støðuføst í mun til ásettar fundardagar.

Innihaldsliga verður eisini mett, at málini fáa eina gjøllari og harvið betri viðgerð við tað, at málini sum meginregla verða viðgjørd av trimum løgfrøðingum. Upplýsingar, lógargrundarlag og sjónarmið partanna verða á henda hátt lýst og umrødd meira gjølla, áðrenn niðurstøða verður gjørd.

Ein fyrimunur við hesum, at fleiri løgfrøðingar eru á flest øllum málum, er, at vitanin um økini og førleikin at viðgera fleiri ymisk mál, verður breiddur út til fleiri løgfrøðingar á stovninum og hetta gerst ein stór styrki hjá stovninum.

Hinvegin, so hevur júst hetta, at fleiri løgfrøðingar enn áður skulu seta seg so væl inn í nógv fleiri mál, við sær, at Kærustovnurin skal seta størri løgfrøðiliga orku av til hvørt einstakt málið, enn neyðugt var eftir gomlu skipanini. Gjørt varð eisini greitt frá byrjan, at nýggja skipanin fór at krevja størri løgfrøðiliga orku inni á stovninum. Hesin størri tørvurin á orku, er sjálvsagt vorðin alsamt týðiligari, so hvørt sum skiftistíðin er gingin og endaliga umskipanin hevur nærkast.

Skipanin við serkønum hevur eisini verið væleydnað. Skipanin er nú meiri smidlig og til ber at innkallað júst ta serfrøðina, sum verður mett neyðug til einstaka málið. Mett verður um í hvørjum einstøkum føri, um málið kann avgreiðast av løgfrøðingum ella um serkøn eru neyðug fyri viðgerðina. Hetta bar ikki til eftir gomlu skipanini, har sama samanseting av fakkunnleika tók støðu til øll mál. Soleiðis er til dømis tannlækni tikin við í viðgerðina av máli, har neyðugt er at meta um tannviðgerð og fiskivinnuserkønur til skattamál. Hetta verður mett at vera við til at lyfta fakligu góðskuna á málsviðgerðini hjá Kærustovninum.

Tá løgfrøðiligar tulkingar eru tað berandi í málinum, er ikki neyðugt at hava serkøn við í viðgerðini. Soleiðis eru mál um umsóknarfreistir, útrokningar, barnagjald v.m. avgreidd av løgfrøðingum á Kærustovninum, uttan at serkøn hava verið við í viðgerðini.

Viðmerkjast skal, at støðan viðvíkandi nýtslu av serkønum, er ymisk á ymsu økjunum sum Føroya Kærustovnur varðar av. Á ymsum økjum taka tey serkønu avgerðir saman við Føroya Kærustovni, meðan tað á øðrum økjum vera nýtt serkøn eftir tørvi.

Hóast nevndir eru niðurlagdar, hevur verið hildið fast við leistinum at býta ársfrágreiðingarnar upp í partar eftir málsøkjum, soleiðis, at tað framvegis ber til hjá áhugaðum at kunna seg um alt virksemið hjá stovninum ella bert at kunna seg við einstaka økið, sum viðkomandi er áhugaður í. Hetta uppbýtið í økir fylgir yvirskipað skipanini áðrenn, við ymsu kærunevndunum, og hesin leisturin framgongur eisini av uppbýtinum av økjum í kunngerð nr. 161 frá 14. desember 2021 um starvsskipan fyri Føroya Kærustovn.

Tórshavn, februar 2024

Anja Hovgaard
*stjóri*

# 2/KÆRUSTOVNURIN

Kjarnuuppgávan hjá Føroya Kærustovni var, fram til 1. januar 2022, í høvuðsheitum at vera skrivstova hjá kærunevndum, ið viðgera avgerðir hjá almennum myndugleikum.

Tann 23. november 2021 samtykti Løgtingið løgtingslóg um Føroya Kærustovn og hevði hetta við sær, at Føroya Kærustovnur fór frá at vera skrivstova hjá kærunevndum, ið viðgera avgerðir hjá almennum myndugleikum, til at vera ein sjálvstøðugur kærumyndugleiki fyri fyrisitingarligar avgerðir, tá tað er ásett í løgtingslóg ella við heimild í løgtingslóg. Harumframt fór Føroya Kærustovnur eisini at taka avgerðir í málum, tá ið tað er ásett í løgtingslóg.

Í tíðarskeiðinum frá 1. januar 2022 til 1. januar 2024 hevur Føroya Kærustovnur tí verið í eini skiftistíð. Kærunevndir og nevndir eru í hesum tíðarskeiðinum tiknar av og virkisøkið teirra flutt til Føroya Kærustovn.

Tann 1. januar 2022 vórðu tær fyrstu nevndirnar tiknar av. Tær eftirverandi nevndirnar vórðu síðani tiknar av eftir eini tíðarætlan, sum ásett í § 16 í Løgtingslóg nr. 147 frá 25. november 2021 um Føroya Kærustovn, og virkisøkið teirra varð so hvørt flutt til Føroya Kærustovn.

Seinasta nevndin – Tvingsilsnevndin – varð avtikin tann 1. januar 2024 og varð hetta samstundis seinasta stigið í umskipanini av Føroya Kærustovni.

### 2.1 Føroya Kærustovnur sum skrivstova hjá kærunevndum og nevndum

Kærustovnurin fyrireikar kærumál til Psykiatrisku sjúklingakærunevndina. Kærustovnurin upplýsir málini og ger løgfrøðilig tilmæli til niðurstøðu, sum verða løgd fyri nevndina til støðutakan.

Eisini upplýsir og fyrireikar Kærustovnurin mál til Høvuðsbarnaverndarnevndina og Tvingsilsnevndina. Høvuðsbarnaverndarnevndin tekur m.a. avgerð um umsorganaryvirtøku av børnum og um familjuviðgerð á stovnum hjá landinum. Útgangsstøðið er, at barnaverndartænasturnar hava lýst málini til fulnar, áðrenn tey verða send Kærustovninum, og er uppgávan tá fremst av øllum, at kanna um grundarlag er fyri at fylgja tilmælinum ella ikki, herundir at kanna, um upplýsingarnar eru nøktandi til støðutakan og at syrgja fyri at fáa til vega neyðugar upplýsingar, um hetta ikki er so.

Tvingsilsnevndin tekur bæði avgerð um góðkenning av inntrivum og viðger kærumál um inntriv. Inntrivini fevna m.a. um nýtslu av ávaringar- og peilingarskipanum, at halda persóni føstum í sambandi við reinføri, flyting uttan samtykki og forða fyri atgongd til internet. Uppgávan fevnir tí um at kanna, um grundarlag er fyri at fylgja tilmælinum frá Almannaverkinum ella kommununum, her undir at kanna, um upplýsingarnar eru nøktandi til støðutakan og at syrgja fyri at fáa til vega neyðugar upplýsingar, um hetta ikki er so. Harafturat er uppgávan at upplýsa og gera løgfrøðilig tilmæli um tey kærumál, sum Tvingsilsnevndin móttekur.

Psykiatriska sjúklingakærunevndin og Høvuðsbarnaverndarnevndin vórðu avtiknar 1. juli 2023, so árið á hesum málsøkjum hevur tískil verið tvíbýtt, og hevur Føroya Kærustovnur sostatt verið skrivstova hjá nevndunum fyrra part av árinum og sjálvstøðugur avgerðarmyndugleiki á hesum økjum seinnu hálvu av árinum 2023.

### 2.2 Føroya Kærustovnur sum sjálvstøðugur kærumyndugleiki

Føroya Kærustovnur er kærumyndugleiki fyri fyrisitingarligar avgerðir frá almennum myndugleikum, tá ið tað er ásett í lóg, løgtingslóg ella við heimild í løgtingslóg.

Tá kæra er innkomin, sær Føroya Kærustovnur til, at málið verður upplýst, soleiðis at tað er klárt til støðutakan. Tá ið málið er fult upplýst, verður Føroya Kærustovnur settur við stjóranum og tveimum løgfrøðingum. Í serligum førum kann stjórin gera av, at Føroya Kærustovnur verður settur við stjóranum og fýra løgfrøðingum.

Í málum, har serkunnleiki verður mettur neyðugur fyri viðgerðina, kann Føroya Kærustovnur verða settur við stjóranum og einum ella tveimum løgfrøðingum umframt einum ella tveimum viðkomandi serkønum.

Tá barnaverndarmál, tvingsilsmál, psykiatrimál og arbeiðsloysisskipanarmál verða viðgjørd, verður Kærustovnurin settur við løgfrøðingum á Kærustovninum umframt serkønum.

Kærustovnurin viðger eisini umsóknir frá borgarum um eftirgeving, útsetan og umskipan av skuld, sum fyrr vórðu viðgjørdar av Skuldarumskipanarnevndini.

Sí nærri kunning um kærunevndirnar og málsøkini, sum Føroya Kærustovnur umsitur á heimasíðuni hjá Kærustovninum.

## STARVSFÓLK

Starvsfólkatalið á stovninum eru umleið 13½ fulltíðarstørv. Starvsfólkahópurin fevnir um 1 stjóra, 9½ løgfrøðingar, 1 deildarleiðara og 2 skrivstovufólk.

## FÍGGJARVIÐURSKIFTI

### Fíggjarjáttanin hjá Kærustovninum 2023:

| | | |
|---|---|---|
| Lønir v.m. | kr. | 9.015.000 |
| Keyp av vørum og tænastum | kr. | 937.000 |
| Keyp av útbúnaði, netto | kr. | 104.000 |
| Leiga, viðlíkahald og skattur | kr. | 372.000 |
| | | |
| Flyting frá ALS | kr. | - 182.000 |
| Flyting frá barsil | kr. | - 50.000 |
| Gjald fyri kærur | kr. | - 4.000 |
| | | |
| **Nettoútreiðslujáttan** | **kr.** | **10.196.000** |

# 3/VIRKSEMIÐ Í 2023

## NÝGGJ MÁL

Tilsamans 396 mál eru innkomin til Kærustovnin í 2023 og eru hetta væl fleiri enn tey 315 sum komu inn í 2022 og eisini eitt fleiri enn tey 370 og 367 sum vórðu móttikin árini undan 2022. Talið á móttiknum málum í 2023, er tað hægsta talið av móttiknum málum síðani 2016, tá talið av móttiknum málum varð omanfyri 400.

Vanligt er, at ávíst sveiggj er í talinum av móttiknum málum á teimum ymsu økjunum og hetta hevur sjálvandi eisini við sær sveiggj í samlaða talinum av móttiknum málum.

Um hugt verður eitt sindur nærri eftir tølunum av móttiknum málum á einstøku økjunum, so sæst at talið av móttiknum málum á barnaverndarøkinum er hækkað munandi í 2023 í mun til 2022. Sigast kann, at talið av móttiknum málum í 2023 er meira í tráð við tølini nógvu undanfarnu árini og at 2022 varð eitt serligt ár, har tað vórðu móttikin serliga fá mál á barnaverndarøkinum.

Eitt annað, sum eisini er serstakt við tølunum í 2023 er, at talið av tvingsilsmálum er trífaldað. Tvingsilsøkið er rættiliga nýtt og tað er tí ikki óvæntað, at tað er ein støðug øking í talinum av móttiknum málum á hesum økinum.

Eitt triðja, sum kanska eisini er sermerkt í 2023 og sum er vert at nevna, er, at talið av móttiknum málum á skattaøkinum er voksið við einari helvt. Talið av móttiknum málum á skattaøkinum í 2023 er tað hægsta talið síðani 2016, sum varð eitt ár, har tað vórðu móttikin heilt óvanliga nógv mál á Skattaøkinum.

Nevnast kann eisini, at tað á Psykiatriska sjúklingaøkinum eru móttikin 12 mál í 2023, eftir at tað einans vórðu móttikin 4 mál í 2022. Talið í 2023 er tó meira líkt fleiri av undanfarnu árunum og sostatt má staðfestast, at lága talið av móttiknum málum í 2022 hevur verið óvanligt.

**396**
**NÝGGJ MÁL**



## AVGREIDD MÁL

Avgreidd eru 399 mál í 2023 og er hetta væl meira enn undanfarna árið, tá tað vórðu avgreidd 347 mál. Tey 399 avgreiddu málini í 2023 eru eisini hægsta talið av avgreiddum málum síðani 2016, tá talan varð um eitt heilt serligt ár, har tað vórðu avgreidd óvanliga nógv mál.

Sum nevnt áður, so eru tað á hvørjum ári sveiggj í talinum av málum hjá Kærustovninum, bæði hvat viðvíkur samlaðu avgreiðsluni og eisini í mun til avgreiðsluna á einstøku økjunum.

Í 2023 er kanska serliga vert at bíta merki í, at tað hava verið avgreidd munandi færri mál á almannaøkinum, meðan tað er ein rættiliga stóru vøkstur í talinum av avgreiddum málum á barnaverndarøkinum og skattaøkinum.

Sæð í einum longri tíðarhøpi, so kann sigast, at talið av avgreiddum málum á barnaverndarøkinum í 2023 er komið aftur á vanliga støði, meðan talið av avgreiddum málum á almannaøkinum er munandi lægri enn vanligt. Eisini er talið á avgreiddum málum á skattaøkinum í 2023 nakað høgt sæð í einum longri tíðarhøpi.

Mál innan økini psykiatri, tvingsil, barnavernd og stundum eisini á vinnuøkinum hava so mikið stuttar viðgerðartíðir, at tey stórt sæð altíð verða avgreidd sama árið, sum tey eru móttikin. Talið av avgreiddum málum samsvarar tí stórt sæð við talinum av innkomnum málum, og tá færri mál eru móttikin, hevur hetta eina beinleiðis ávirkan á talið av avgreiddum málum.

**399**
**AVGREIDD MÁL**




## MÁL UM INNLIT

Umframt vanligu málini, eru eisini umbønir um innlit viðgjørdar. Talan kann vera um umbønir um alment innlit frá t.d. fjølmiðlum ella partsinnlit frá pørtum í einum máli.

Bert ein umbøn um innlit er viðgjørd í 2023. Talan varð um umbøn um innlit í mál á almanna-, familju- og heilsuøkinum.

**1**
**MÁL UM INNLIT**

Miðal viðgerðartíðirnar í 2023 á teimum ymisku økjunum eru í høvuðsheitum líknandi undanfarna árið og verður hetta mett sum verandi sera gott.

Viðgerðartíðirnar á ymisku økjunum eru ymiskar og tað er m.a. eisini ein avleiðing av, at økini eru ógvuliga ymisk. Summi økir hava lógarásettar freistir í mun til viðgerðartíð, meðan mál á øðrum økjum kunnu hava nógv drúgvari tilgongdir, har nógvir ymiskir partar skulu viðvirka til at upplýsa málið til fulnar.

Tað er heldur ikki óvanligt við sveiggjum í viðgerðartíðunum á ymsum økjum, hetta kanska serliga um samlaða talið av málum á økinum er lítið. Tá samlaða talið av málum á einum økið er lítið, tá skulu bert fá mál draga út í viðgerðini, fyri at samlaða viðgerðartíðin á økinum ávirkast munandi.

Í 2023 er serliga viðkomandi at bíta merki í, at viðgerðartíðin á skattaøkinum er økt munandi í mun til undanfarna ári. Hetta skyldast, at ein stórur bólkur av málum, sum øll hingu saman, hava verið í bíðistøðu í áravís, tí bíðað hevur verið eftir avgerðum frá útlendskum myndugleikum og upplýsingum frá umboðum hjá pørtunum, áðrenn málini kundu endaliga avgreiðast av Kærustovninum. Tá hesin bólkurin av málum er umboðandi ein sættapart av samlaðu avgreiddu málunum í 2023, so er eyðsæð, at hetta hevur stóra neiliga ávirkan á samlaðu viðgerðartíðina á skattaøkinum. Um hesin bólkurin av málum ikki verður tikin við í útrokningina av samlaðu viðgerðartíðina á skattaøkinum, so er viðgerðartíðin heilt góð og á umleið sama støði sum í 2022.

Viðgerðartíðirnar eru annars ymiskar, eins og málini eru ymisk í vavi og torleika. Viðgerðartíðirnar verða á øllum økjum roknaðar frá tí degi, málið er innkomið til Kærustovnin, til tað er avgreitt á fundi. Íroknað viðgerðartíðina er sostatt tann tíðin, tað tekur at fáa málið lýst hjá avvarðandi myndugleika, hoyrt partarnar og framleitt løgfrøðiligt upprit um málið.



# 4/ALMANNA-, FAMILJU- OG HEILSUMÁL

## VIÐGERÐARØKIÐ

Mál, sum verða bólkað sum almanna-, familju- og heilsumál, eru kærur um:

- Avgerðir hjá Almannaverkinum eftir m.a. almannapensjónslógini, dagpeningalógini, lóg um almannatrygd og tænastur o.ø.
- Avgerðir hjá Sjúkrahúsverkinum, sum ikki eru um heilsufakligt virksemi.
- Avgerðir hjá kommunustýrum eftir lóg um barna- og ungdómstannrøkt.
- Avgerðir hjá Heilsutrygd og tilskotsnevndini eftir lóg um almenna heilsutrygd.
- Avgerðir hjá kommunum eftir lóg um heimatænastu og eldrarøkt, og ávísar avgerðir eftir barnaverndarlógini.
- Avgerðir hjá Familjufyrisitingini eftir lóg um rættarstøðu barnanna, lóg um foreldramyndugleika og samveru, verjumálslógini o.ø.

## NÝGGJ MÁL

Í 2023 vórðu 114 kærur innan almanna-, familju- og heilsumál latnar Føroya Kærustovni. Talið av móttiknum málum er á sama støði sum undanfarin ár, eins og býtið av málum, fevnd av almanna-, familju- og heilsumálum, er líkt undanfarnum árum.

Føroya Kærustovnur móttók 97 kærur um avgerðir hjá Almannaverkinum og 15 kærur um avgerðir frá Familjufyrisitingini. Aftrat hesum varð ein kæra latin Kærustovninum um avgerð frá einari kommunu og ein kæra um avgerð frá Heilsutrygd.



## BÝTIÐ AV MÓTTIKNUM MÁLUM

| | 2021 | 2022 | 2023 |
|---|---|---|---|
| Almannapensjónslógin – ískoyti, afturgjald, eftirrokning v.m. | 10 | 15 | 17 |
| Almannapensjónalógin – tillutan, hækkan, broyting v.m. | 14 | 13 | 11 |
| Barnaverndarlógin | 4 | 4 | 0 |
| Dagpeningalógin | 25 | 18 | 10 |
| Dagstovnalógin | 0 | 1 | 0 |
| Heilsutrygdarlógin | 0 | 0 | 1 |
| Hjúnabandslógin | 0 | 0 | 1 |
| Innlit | 1 | 0 | 2 |
| Lóg um almannatrygd og tænastur | 24 | 23 | 31 |
| Lóg um arbeiðsfremjandi tiltøk | 6 | 8 | 4 |
| Lóg um barnagjald til einsamallar uppihaldarar | 1 | 4 | 4 |
| Lóg um familjuískoyti | 5 | 4 | 18 |
| Lóg um foreldramyndugleika og samveru | 8 | 4 | 7 |
| Lóg um heimatænastu | 1 | 3 | 1 |
| Lóg um rættarstøðu barnanna | 7 | 4 | 5 |
| Lóg um sjúkrahúsverkið | 1 | 4 | 0 |
| Lóg um stuðul til uppihaldspening | 2 | 3 | 2 |
| Verjumál | 1 | 1 | 0 |
| Annað | 0 | 2 | 0 |
| **Í alt** | **110** | **111** | **114** |

## AVGREIDD MÁL

Føroya Kærustovnur hevur í 2023 avgreitt tilsamans 107 kærur um avgerðir fevndar av málsøkinum almanna-, familju- og heilsumál.

Flestu málini, 71 í tali, vórðu avgreidd av stjóra og tveimum løgfrøðingum, 24 mál fullu burtur, áðrenn tey vórðu klár til støðutakan.

Tvey mál vórðu í 2023 avgreidd sambært § 4 í lóg um Føroya Kærustovn. Eitt mál viðvíkjandi uppafturtøku varð avgreitt av stjóranum á Føroya Kærustovni, og eitt mál viðvíkjandi kærufreist varð avgreitt av løgfrøðingi á Føroya Kærustovni.

Í 10 málum varð Føroya Kærustovnur settur við stjóranum, tveimum løgfrøðingum og einum serkønum sambært § 5, stk. 3 í lóg um Føroya Kærustovn. Í níggju av hesum málum varð Kærustovnurin settur við einum lækna sum serkønur, og í einum máli varð Kærustovnurin settur við einum tannlækna sum serkønur. Í málum, sum lækni var við at avgreiða, vóru tvey mál um fyritíðarpensjón, eitt mál um stuðul til arbeiðsbúgving, eitt um leingjan av endurvenjing, eitt um stuðul til bil og fýra mál um sýtan av dagpeningini, harav eitt teirra var um sýtan av dagpeningi vegna sjúkan hjúnafelaga. Málið, sum tannlækni var við at avgreiða, var kæra um sýtan av persónligari viðbót, har søkt var um stuðul til tannviðgerð.

## BÝTIÐ AV AVGREIDDUM MÁLUM

| | 2021 | 2022 | 2023 |
|---|---|---|---|
| Almannapensjónslógin – ískoyti, afturgjald, v.m. | 7 | 23 | 17 |
| Almannapensjónslógin – tillutan, hækkan, v.m. | 10 | 12 | 7 |
| Barnaverndarlógin | 1 | 6 | 0 |
| Dagpeningalógin | 17 | 20 | 12 |
| Dagstovnalógin | 0 | 0 | 2 |
| Heilsutrygdarlógin | 0 | 0 | 1 |
| Hjúnabandslógin | 0 | 0 | 1 |
| Innlit | 0 | 1 | 1 |
| Lóg um almannatrygd og tænastur | 18 | 32 | 24 |
| Lóg um arbeiðsfremjandi tiltøk | 6 | 5 | 7 |
| Lóg um barnagjald til einsamallar uppihaldarar | 2 | 5 | 2 |
| Lóg um familjuískoyti | 1 | 3 | 19 |
| Lóg um foreldramyndugleika og samveru | 9 | 4 | 2 |
| Lóg um heimatænastu | 1 | 2 | 2 |
| Lóg um rættarstøðu barnanna | 6 | 5 | 5 |
| Lóg um stuðul til uppihaldspening | 2 | 2 | 2 |
| Lóg um sjúkrahúsverkið | 2 | 4 | 0 |
| Verjumál | 1 | 1 | 0 |
| Annað | 11 | 8 | 3 |
| **Í alt** | **94** | **133** | **107** |

## AVGREIÐSLAN

Nógv flestu kærurnar innan almanna-, familju- og heilsumál eru um avgerðir hjá Almannaverkinum og sæst hetta sjálvandi aftur í býtinum av avgreiddum málum. Heili 90 av teimum 107 avgreiddu kærunum í 2023 vóru um avgerðir hjá Almannaverkinum. Tríggjar kærur fullu uttan fyri heimildarøkið hjá Kærustovninum og vórðu av hesari orsøk avvístar.



# ALMANNAVERKIÐ

## AVGREIÐSLAN AV MÁLUM HJÁ ALMANNAVERKINUM

Í 2023 hevur Føroya Kærustovnur avgreitt 90 kærur um avgerðir frá Almannaverkinum. Málsøkið hjá Almannaverkinum er víttfevnandi, og tekur Almannaverkið avgerðir innan nógv ymisk málsøkir, ið eru at meta sum almanna-, familju- og heilsumál. Hetta er somuleiðis orsøk til, at Kærustovnurin viðger og avgreiðir nógv flestar kærur um avgerðir frá Almannaverkinum, um samanborið verður við aðrar myndugleikar, sum taka avgerðir fevndar av málsøkinum almanna-, familju- og heilsumál.

Føroya Kærustovnur hevur í 2023 avgreitt kærur um avgerðir frá Almannaverkinum innan hesi málsøkir:

### Almannapensjónslógin

Í 2023 avgreiddi Føroya Kærustovnur 24 kærur um avgerðir frá Almannaverkinum tiknar eftir almannapensjónslógini, harav 13 teirra vórðu staðfestar.

Kærustovnurin heimvísti 4 avgerðir til nýggja viðgerð hjá Almannaverkinum. Tær heimvístu avgerðirnar vóru kærur um avgerðir viðvíkjandi eftirrokning av pensjón, og vórðu hesar avgerðir heimvístar, tí Kærustovnurin ikki metti, at inntøkugrundarlagið, sum Almannaverkið hevði nýtt til at eftirrokna pensjónirnar, var eftirfarandi og kundi leggjast til grund.

Kærustovnurin avvísti eina kæru, tí kært var ikki um eina fyrisitingarliga avgerð, men hinvegin um eitt prosessuelt stig hjá myndugleikanum, sum ikki er fevnd av virkisøkinum hjá Kærustovninum.

Ein kæra fall burtur, tí Almannaverkið hevði tikið avgerð um at játta kæraranum pensjón, og kærarin ikki helt fast í kæru síni.

Tvær umbønir um uppafturtøku vórðu viðgjørdar, og sýtti Kærustovnurin at taka málini upp til nýggja viðgerð, tí víst varð ikki á nýggjar upplýsingar, sum kundu grunda, at málini høvdu fingið annað úrslit, um hesar fyrilógu, tá málini vórðu viðgjørd.

Kærustovnurin tók í trimum málum støðu til, um kærufreistin, sum ásett er í lóg um Føroya Kærustovn, var hildin, og um grundarlag var fyri at loyva fráviki frá kærufreistini. Í tveimum málum sýtti Kærustovnurin kæraranum frávik frá kærufreistini, tí víst var ikki á serligar orsøkir, sum kundu loyva fráviki frá kærufreistini. Kærurnar vórðu tí burturvístar. Í einum máli varð loyvt kæraranum frávik frá kærufreistini, tí mett varð, at víst varð á serligar orsøkir til, at kæran var latin inn ov seint.

### Lóg um almannatrygd og tænastur

Kærustovnurin avgreiddi í 2023 tilsamans 24 kærur um avgerðir tiknar eftir lóg um almannatrygd og tænastur, og vórðu níggju avgerðir hjá Almannaverkinum staðfestar.

Kærustovnurin broytti eina avgerð um uppihaldsveiting, tí Kærustovnurin metti ikki, at grundarlag var fyri at broyta veitingarstøðið, og harvið lækka veitingina, soleiðis sum Almannaverkið hevði gjørt.

Kærustovnurin heimvísti tvær avgerðir til nýggja viðgerð hjá Almannaverkinum, tí Kærustovnurin metti tað vera neyðugt við fleiri upplýsingum frá Almannaverkinum, og at neyðugt var, at Almannaverkið viðgjørdi ávís viðurskiftir nærri, áðrenn Kærustovnurin kundi viðgera málini.

Kærustovnurin avvísti tvær avgerðir, tí talan ikki var um fyrisitingarligar avgerðir, ið vóru kærdar, og tí vóru kærurnar ikki fevndar av málsræði Kærustovnsins.

Ein umbøn um uppafturtøku varð viðgjørd, og játtaði Kærustovnurin uppafturtøku, tí mett varð, at nýggjar upplýsingar vóru í málinum, ið møguliga kundu hava ávirkan á avgerðina, sum áður var tikin.

Tilsamans fullu níggju kærur burtur, harav seks teirra fullur burtur, tí Almannaverkið tók nýggja avgerð í málinum og vóru hesar avgerðir til fyrimuns fyri kæraran. Tvær kærur fullu burtur, tí Almannaverkið boðaði frá, at Almannaverkið fór at taka málini upp til nýggja viðgerð. Ein kæra fall burtur, tí kærarin tók kæruna aftur.

### Dagpeningalógin

Føroya Kærustovnur avgreiddi 12 kærur um avgerðir eftir dagpeningalógini, harav seks teirra vórðu staðfestar.

Kærustovnurin heimvísti tríggjar avgerðir til nýggja viðgerð hjá Almannaverkinum. Ein avgerð varð heimvíst, tí mett varð, at avgerðin hjá Almannaverkinum hevði týðandi manglar og tí skuldi viðgerast av nýggjum. Ein avgerð varð heimvíst, tí tað ikki var greitt, á hvørjum

grundarlag Almannaverkið hevði tikið avgerðina. Ein triðja avgerð varð heimvíst, tí málið ikki var nøktandi upplýst.

Tríggjar kærur fullu burtur. Tvær teirra fullu burtur, tí Almannaverkið tók nýggja avgerð í málunum, og ein kæra fall burtur, tí Almannaverkið tók málið upp til nýggja viðgerð.

### Lóg um arbeiðsfremjandi tiltøk

Føroya Kærustovnur avgreiddi í 2023 sjey kærur um avgerðir tiknar eftir lóg um arbeiðsfremjandi tiltøk, og vórðu fýra teirra staðfestar.

Kærustovnurin broytti eina avgerð hjá Almannaverkinum. Almannaverkið hevði tikið avgerð um framhaldandi at játta kæraranum tillagað starv, men hevði Almannaverkið játtað kæraranum tillagað starv eftir nýggjum lógarkarmi sum m.a. hevði við sær, at útrokningin av lønarískoytinum bleiv broytt. Kærustovnurin metti ikki, at mál kærarans varð fevnt av nýggju reglunum. Kærustovnurin metti hinvegin, at kærarin átti at fáa lønarískoyti eftir teimum higartil galdandi reglunum og broytti tí avgerðina hjá Almannaverkinum.

Kærustovnurin heimvísti eina avgerð til nýggja viðgerð, tí málið ikki var nøktandi upplýst, til at Kærustovnurin kundi taka avgerð í málinum.

Kærustovnurin sýtti í einum máli at geva frávik frá kærufreistini sum ásett er í lóg um Føroya Kærustovn, og varð kæran tí avvíst.

### Lóg um barnagjald til einsamallar uppihaldarar

Kærustovnurin avgreiddi í 2023 tilsamans tvær kærur um avgerðir tiknar eftir lóg um um barnagjald til einsamallar uppihaldarar. Ein avgerð varð staðfest, og ein varð heimvíst til nýggja viðgerð hjá Almannaverkinum. Avgerðin varð heimvíst, tí Almannaverkið hevði kravt afturútgoldið barnagjald, uttan at hava mett um og grundgivið fyri, hví Almannaverkið metti, at kærarin av órøttum og móti betri vitandi hevði móttikið veiting sambært lógini um barnagjald til einsamallar uppihaldarar.

### Lóg um familjuískoyti

Í 2023 viðgjørdi Føroya Kærustovnur 19 kærur um avgerðir tiknar eftir lóg um familjuískoyti. Hetta er nakað fleiri enn í 2022, tá ið Kærustovnurin viðgjørdi tríggjar kærur um avgerðir tiknar eftir lóg um familjuískoyti. Ein orsøk til vøksturin av kærum innan lóg um familjuískoyti kann vera tann, at í ávikavist 2022 og 2023 varð lógin broytt og ásett varð, at húski í eitt tíðarskeið kundi søkja um at fáa ávikavist oljuískoyti og hjálparískoyti eftir nærri ásettum treytum. Endamálið við lógarbroytingunum var at minka um ringastu avleiðingarnar av prísvøkstrinum, ið hevur verið.

Av teimum 19 kærunum, sum vórðu avgreiddar í 2023, vóru 18 teirra kærur um avgerðir um ávikavist oljuískoyti og hjálparískoyti, harav Kærustovnurin staðfesti 12 teirra. Kærustovnurin heimvísti eina avgerð um sýtan av hjálparískoyti, tí Kærustovnurin metti ikki, at avgerðin hjá Almannaverkinum var nøktandi grundgivin, tí tað sást ikki, hvørjar upplýsingar Almannaverkið hevði lagt til grund fyri avgerðini, og hvat ogn kærarans varð mett at vera um umsóknarmundið.

Fimm kærur fullu burtur, tí Almannaverkið tók nýggja avgerð í málunum og játtaði kærarunum ávikavist oljuískoyti ella hjálparískoyti.

Ein kæra um avgerð um sýtan av familjuískoyti varð avgreidd í 2023 og fall hendan burtur, tí Almannaverkið tók nýggja avgerð um at játta kæraranum familjuískoyti, sum annars varð sýtt honum.

### Lóg um stuðul til uppihaldspening

Kærustovnurin avgreiddi í 2023 tvær kærur um avgerðir eftir lóg um stuðul til uppihaldspening, og varð onnur teirra staðfest. Ein kæra varð avvíst, tí kæran var innkomin ov seint, og víst varð ikki á orsøkir, sum kundu grunda frávik frá kærufreistini, sum ásett er í lóg um Føroya Kærustovn.

Mál, ið verða viðgjørd eftir lóg um stuðul til uppihaldsveiting, eru mál, har persónur, ið er álagdur at rinda barna- og hjúnafelagagjøld søkir Almannaverkið um stuðul til uppihaldspening eftir nærri ásettum treytum í lógini.

## AVGREIÐSLAN AV MÁLUM HJÁ ALMANNAVERKINIM

| | 2021 | 2022 | 2023 |
|---|---|---|---|
| Staðfest | 42 | 66 | 46 |
| Broytt | 8 | 9 | 2 |
| Heimvíst | 4 | 12 | 12 |
| Burturfallin | 7 | 14 | 19 |
| Burturvíst | 4 | 1 | 3 |
| Kærufreist | 6 | 5 | 5 |
| Uppafturtøka | 2 | 2 | 3 |
| **Í alt** | **73** | **109** | **90** |




GG! Í uppgerðini i %, er sæð burtur frá málum, sum eru burturvíst, málum um kærufreist og uppafturtøku.

# KOMMUNURNAR

## AVGREIÐSLAN AV MÁLUM HJÁ KOMMUNUNUM

| | 2021 | 2022 | 2023 |
|---|---|---|---|
| Staðfest | 2 | 1 | - |
| Heimvíst | - | 1 | 1 |
| Burturfallin | - | 3 | 2 |
| Burturvíst | 1 | 3 | - |
| Kærufreist | - | - | 1 |
| **Í alt** | **3** | **8** | **4** |

Føroya Kærustovnur hevur í 2023 avgreitt tríggjar kærur um avgerðir frá kommunum og kommunalum stovnum. Í einum máli tók Kærustovnurin eisini støðu til, um frávik kundi gevast frá lógarásettu kærufreistini.

Kærurnar á hesum øki fevna millum annað um avgerðir hjá Barnaverndarstovuni, barnaverndartænastum, heimatænastum og kommunum kring landið. Hesi taka avgerðir eftir millum annað barnaverndarlógini, dagstovnalógini og lóg um heimatænastu v.m., sum kunnu kærast til Kærustovnin.

Føroya Kærustovnur avgreiddi tvær kærur um avgerðir tiknar eftir lóg um heimatænastu. Bæði málini fullu burtur, tí kommunan tók nýggja avgerð í málunum.

Ein kæra um avgerð eftir dagstovnalógini, har søkt var um fíggjarligt fríplás, varð heimvíst til nýggja viðgerð, tí Kærustovnurin ikki var samdur í útrokningini av inntøkugrundarlagnum, sum kommunan hevði nýtt.

Í sama máli tók Kærustovnurin støðu til, um kæran var móttikin rættstundis á Føroya Kærustovni. Hóast kæran varð móttikin seinni enn 4 vikur eftir, at kærarin hevði fingið fráboðan um avgerðina, tók Kærustovnurin málið til viðgerðar, og játtaði Kærustovnurin sostatt frávik frá kærufreistini. Avgerðin hjá Kærustovninum var grundað á, at kærarin hevði fingið skeiva kæruvegleiðing, og ongin kærufreist varð givin kæraranum.

# SJÚKRAHÚSVERKIÐ

## AVGREIÐSLAN AV MÁLUM HJÁ SJÚKRAHÚSVERKINUM

| | 2021 | 2022 | 2023 |
|---|---|---|---|
| Staðfest | 1 | - | - |
| Burturvíst | - | 4 | - |
| **Í alt** | **1** | **4** | **0** |

Í 2023 varð onki mál fevnt av lóg um sjúkrahúsverkið avgreitt, eins og ongin kæra er móttikin innan hetta málsøkið í 2023.

Kærur um avgerðir frá sjúkrahúsverkinum, sum eru fevndar av málsræði Kærustovnsins, eru kærur, sum ikki eru um heilsufakligt virksemi. Hetta kann t.d. vera kæra um sýtan av fylgjara í sambandi við sjúkuviðgerð uttanlands.

# FAMILJUFYRISITINGIN

## AVGREIÐSLAN AV MÁLUM HJÁ FAMILJUFYRISITINGINI

| | 2021 | 2022 | 2023 |
|---|---|---|---|
| Staðfest | 14 | 9 | 4 |
| Broytt | - | - | 1 |
| Heimvíst | 1 | 1 | 1 |
| Burturfallin | 1 | 2 | 3 |
| **í alt** | **16** | **12** | **9** |

Føroya Kærustovnur avgreiddi í 2023 tilsamans 9 kærur um avgerðir frá Familjufyrisitingini.

Familjufyrisitingin tekur avgerðir eftir millum annað lóg um foreldramyndugleika og samveru, lóg um rættarstøðu barnanna, hjúnabandslógini og verjumálslógini.

Avgreiddar vórðu tvær kærur um avgerðir eftir lóg um foreldramyndugleika og samveru. Ein teirra varð staðfest og ein heimvíst, tí mett varð, at tørvur var á fleiri upplýsingum, áðrenn Kærustovnurin kundi taka avgerð í málinum.

Avgreiddar vórðu fimm kærur um avgerðir tiknar eftir lóg um rættarstøðu barnanna, og varð ein teirra staðfest. Tríggjar kærur fullu burtur. Tvær kærur fullur burtur, tí kærarin tók kæru sína aftur, og ein kæra fall burtur, tí Familjufyrisitingin tók málið upp til nýggja viðgerð.

Kærustovnurin broytti eina avgerð eftir lóg um rættarstøðu barnanna, tí Kærustovnurin metti, at kærarin, sum varð álagdur at rinda barnagjald, hevði hildið sína uppihaldsskyldu, og at grundarlag tí ikki var fyri at áseta barnagjald.

Kærustovnurin avgreiddi eina kæru um avgerð hjá Familjufyrisitingini at sýta kæraranum innlit í eitt verjumál. Kærustovnurin staðfesti avgerðina hjá Familjufyrisitingini at sýta kæraranum partsinnlit sambært fyrisitingarlógini og innlit sambært innlitslógini.

Umframt hetta, avgreiddi Kærustovnurin eina kæru um avgerð eftir hjúnabandslógini og varð avgerðin hjá Familjufyrisitingini staðfest.

# HEILSUTRYGD

## AVGREIÐSLAN AV MÁLUM HJÁ HEILSUTRYGD

| | 2021 | 2022 | 2023 |
|---|---|---|---|
| Heimvíst | - | - | 1 |
| **Í alt** | 0 | 0 | 1 |

Kærustovnurin avgreiddi eina kæru um avgerð frá Heilsutrygd um heilsutrygdargjald.

Kært varð um, at Heilsutrygd hevði sýtt kæraranum frítøku fyri gjaldi til Heilsutrygd. Kærustovnurin heimvísti málið til nýggja viðgerð hjá Heilsutrygd. Kærustovnurin metti, at Heilsutrygd ikki ítøkiliga hevði tikið støðu til, um kærarin kann verða frítikin fyri at rinda til Heilsutrygd. Kærustovnurin heimvísti tí málið til Heilsutrygd til nýggja viðgerð, og skal viðgerðin taka støði í, at kærarin, sambært § 55 í stýrisskipanarlógini, skal frítakast frá at gjalda til Heilsutrygd í tann mun, at norðurlendski sáttmálin um sosiala trygd gevur heimild fyri og rætt til tess.

Vísast kann á, at Føroya Kærustovnur, áður Kærunevndin í almanna-, familju- og heilsumálum, í 2019 avgreiddi 36 kærur um avgerðir frá Heilsutrygd, sum allar í høvuðsheitum snúðu seg um, hvørt kærararnir kundu frítakast fyri heilsutrygdargjaldi vísandi til norðurlendska sáttmálan um sosiala trygd, og vísandi til, at kærararnir høvdu goldið til aðra heilsutrygdarskipan í einum norðurlandi, sum kærarin arbeiddi í, men ikki búðu í. Tríggjar líknandi kærur vórðu avgreiddar í 2020, og nú tvey ár seinni, er enn ein kæra viðgjørd og heimvíst av somu orsøk sum tær í 2019 vórðu heimvístar.

# ANNAÐ

Kærustovnurin avvísti harumframt trý mál, sum ikki vóru fevnd av virkisøki og málsøki Kærustovnsins, sum nærri eru lýst í kunngerð um starvsskipan fyri Føroya Kærustovn.

Føroya Kærustovnur avvísti eina kæru um innheintan av ásettum barnagjaldi, sum var fallið til gjaldingar, og sum TAKS innheintaði vegna Almannaverkið. Slíkar avgerðir frá TAKS eru ikki fevndar av málsrræðnum hjá Kærustovninum, og varð kæran tí avvíst.

Føroya Kærustovnur avvísti eina kæru um vantandi hoyring og kunning um avgerð hjá Almannaverkinum at koppseta barn kærarans, sum er umsorganaryvirtikið við uppihaldi á stovni undir Almannaverkinum.

Í avgerðini vísti Kærustovnurin millum annað á, at avgerðir, sum myndugleikin tekur sum liður í at upplýsa máli, eitt nú støðutakan til, um nakar skal hoyrast í málinum, eru at meta sum støðutakan um mannagongdir í samband við, at ein myndugleiki hevur ella fer at taka eina avgerð. Slíkar avgerðir verða eisini nevndar prosessuellar avgerðir, og eru hesar avgerðir sum útgangsstøði ikki sjálvstøðugar fyrisitingarligar avgerðir. Kærustovnurin metti, at í ítøkiliga málinum var talan um kæru um eina prosessuella avgerð. Ásett er ikki í løgtingslóg ella við heimild í løgtingslóg, at slíkar avgerðir kunnu kærast til Føroya Kærustovn. Av somu orsøk er kæran ikki fevnd av málsræðinum hjá Føroya Kærustovni, og hevur Føroya Kærustovnur tí ikki heimild at viðgera kæruna. Kæran varð tí avvíst.

Føroya Kærustovnur avvísti eina avgerð um ásett barnagjald eftir lóg um rættarstøðu barnanna, sum kærarin varð álagdur at rinda barni, ið var innskrivað á stovni hjá landinum. Almannaverkið hevði tikið avgerð um at strika barnagjaldi fyri eitt nærri ásett tíðarskeið. Føroya Kærustovnur vísti á, at tað er Familjufyrisitingin, sum hevur heimild at taka avgerð um, at barnagjald verður ásett, broytt ella sett úr gildi eftir lóg um rættarstøðu barnanna. Talan var sostatt um avgerð, ið fall uttanfyri avgerðarøkið hjá Almannaverkinum. Kærustovnurin avvísti tí kæruna og mælti kæraranum til at venda sær til Familjufyrisitingina við einhvørjum ivamáli um ásetan av barnagjaldi.

# VIÐGERÐARTÍÐIN

Miðal viðgerðartíðin í 2023 var 4 mánaðir.

Hetta er á sama støði sum undanfarin ár. Miðal viðgerðartíðin í 2022 var beint yvir 4 mánaðir, og í 2020 og 2021 var miðal viðgerðartíðin beint undir 5 mánaðir.

Viðgerðartíðin verður roknað frá tí, at kæra er móttikin á Føroya Kærustovni, til kæran er avgreidd á fundi í setta Kærustovninum ella av stjóranum ella løgfrøðingi á Føroya Kærustovni. Íroknað viðgerðartíðini er sostatt tíðin, sum fer til at fáa ummælið frá viðkomandi myndugleika, at partshoyra og innheinta møguligar supplerandi upplýsingar.

Strembað verður altíð eftir, at viðgerðartíðin er so stutt sum gjørligt. Havandi omanfyrinevndu viðurskifti í huga verður miðal viðgerðartíðin fyri almanna-, familju- og heilsumál mett nøktandi.

# SERLIGA ÁHUGAVERT MÁL

## Sýtt stuðul til framhaldandi uppihald á eftirskúla í Danmark

### Mál nr. 23/10008

Barn kærarans hevði gingið eitt ár á eftirskúla í Danmark, og søkt varð um stuðul til framhaldandi uppihald á eftirskúla í eitt ár aftrat. Barnið er rørslutarnað og hevur avmarkað talumál. Fyrra árið á eftirskúlanum varð játtað eftir lóg um arbeiðsfremjandi tiltøk, og heimild var ikki at leingja uppihaldið eftir hesi lóg. Almannaverkið viðgjørdi síðan málið eftir almannalógini, og varð umsóknin sýtt.

Føroya Kærustovnur vísti í avgerð síni á, at sambært § 3 í almannalógini skal hjálp sambært lógini veitast soleiðis, at persónur í størst møguligan mun megnar at uppihalda sær sjálvum og liva eitt so sjálvstøðugt, støðugt og innihaldsríkt lív sum til ber. Sambært § 3, stk. 2, í almannalógini er tað Almannaverkið sum ger av, á hvønn hátt hjálpin sambært lógini skal veitast. Avgerðin tekur støði í tørvi og ynski hjá tí einstaka, í sosialfakligari meting og fíggjarligar rásarúminum fyri tænastu hjá myndugleikanum.

Umsókn kærarans varð viðgjørd sambært § 67 í almannalógini, sum í stk. 1 ásetur, at "Almannaverkið kann gera avtalu um tænastu frá øðrum almennum og privatum veitara til tess at røkja sínar skyldur sambært kapitli 5 og 6 í hesi løgtingslóg." Í stk. 2 er ásett, at "Um nøktandi tilboð ikki kann veitast í Føroyum, kann Almannaverkið gera avtalu við veitara uttanlands."

Almannaverkið hevði mett, at tænastan, ið barn kærarans tørvar, er av slíkum slag, at tað kundi latið seg gjørt at veitt hana í Føroyum, og at tað tískil ikki er heimild at játta tænastuna eftir § 67 í almannalógini. Almannaverkið vísti harumframt millum annað á, at Almannaverkið við støði í eini sosialfakligari meting skal taka støði í tørvinum og ynskinum hjá tí einstaka, skal atlit eisini takast at fíggjarliga rásarúmið, stovnurin hevur fingið játtað, sí § 3, stk. 2 í almannalógini. Hetta merkir, at Almannaverkið hevur fingið tillutað avmarkað fíggjarligt tilfeingi og undir hesum fíggjarligu kørmunum skipa tænasturnar, so flest fólk fáa eitt so dygdargott tilboð sum møguligt. Avmarkaða fíggjarliga tilfeingið ger, at tænastustøðið í Føroyum til heimabúgvandi fólk við serligum tørvi verður sera avmarkað, samanborið við tørvin á tænastum, ið hesi ofta hava.

Almannaverkið hevði í løtuni ikki nakað vart búpláss at veita barninum hjá kærarunum, og tað var ilt at siga, nær tað kundi væntast at fáa eitt. Arbeitt varð við at kanna nærri, hvørja stuðulstænastu og skúlagongd barnið kundi fáa.

Føroya Kærustovnur staðfesti avgerðina hjá Almannaverkinum. Kærustovnurin vísti í avgerð síni millum annað á, at grundarlag ikki var fyri at seta til síðis metingina hjá Almannaverkinum og atliti til fíggjarliga rásarúmið hjá Almannaverkinum er eitt sakligt atlit sambært lógini og viðmerkingunum til lógina, og at veitta tænastan tí eisini er tengd av neyðugari játtan á fíggjarlógini.

# 5/SKATTA- OG AVGJALDSMÁL

## VIÐGERÐARØKIÐ

Føroya Kærustovnur viðger kærur um:

- Avgerðir hjá TAKS um skatt, skattaálíkning, toll, meirvirðisgjald og bindandi svar. Harafturat avgerðir hjá TAKS sambært eftirlønarlógini, lógini um arbeiðsmarknaðareftirlønargrunn, lógini um rentustuðul, o.a.
- Avgerðir hjá Akstovuni um avgjøld við skráseting av motorakførum.

## NÝGGJ MÁL

Í 2023 eru 58 kærur latnar Føroya Kærustovni um skatta- og avgjaldsmál. Millum móttiknu málini í 2023 eru flest kærur á økinum um skatt. Annars eru kærurnar javnt deildar á ymsu økini, tó ein lítil meiriluti av kærunum eru á økjunum um eftirløn, arbeiðsmarknaðareftirløn og toll.

Tær 58 móttiknu kærurnar í 2023 eru nakað væl fleiri enn undanfarin ár. Talið av málum á skatta- og avgjaldsøkinum kann vera skiftandi gjøgnum árini, tá ávís ár stundum hava stóra øking av málum á serligum økjum. Tað kann eitt nú skyldast lógarbroytingum á økjum, nýggja siðvenju hjá myndugleikanum ella broytingar í samfelagsviðurskiftum annars. Ein orsøk til økingina í 2023 er tó helst, at økini, sum hoyrdu til Kommunalu Skattakærunevndirnar, í mai 2022 vórðu flutt til Føroya Kærustovn.




## AVGREIDD MÁL

Føroya Kærustovnur avgreiddi í alt 64 kærur um avgerðir innan skatta- og avgjaldsmál. Hetta er væl hægri enn árini frammanundan. Av hesum vóru 4, ið vórðu afturkallaðar og 9 sum fullu burtur, áðrenn Føroya Kærustovnur tók støðu til teirra. 4 kærur vórðu avgreiddar av stjóranum ella løgfrøðingi á Føroya Kærustovni sambært § 4 í lógini um Føroya Kærustovn. Í einum máli varð Føroya Kærustovnur settur við stjóranum og tveimum løgfrøðingum, umframt einum serkønum. 44 av kærunum vórðu avgreiddar av stjóranum og tveimum løgfrøðingum á Føroya Kærustovni.



## BÝTIÐ AV AVGREIDDUM MÁLUM

| | 2021 | 2022 | 2023 |
|---|---|---|---|
| Skattur | 0 | 13 | 25 |
| Meirvirðisgjald | 8 | 5 | 5 |
| Skrásetingargjald á motorakførum | 2 | 1 | 0 |
| Tollur og onnur avgjøld | 5 | 6 | 11 |
| Kærufreist, uppafturtøka v.m. | 5 | 3 | 7 |
| Annað (m.a. eftirløn, AMEG, veiðirættindi, rentustuðul, ferðaútreiðslur o.a.) | 19 | 6 | 11 |
| Kapitalvinningur | 5 | 5 | 5 |
| **Í alt** | **44** | **39** | **64** |

Býtið millum evnini skiftir nakað hvørt ár. Tó hevur býtið av málum verið nøkunlunda tað sama í 2023 sum í 2022.

## AVGREIÐSLAN

| | 2021 | 2022 | 2023 |
|---|---|---|---|
| Staðfest | 27 | 19 | 36 |
| Burturvíst | 2 | 3 | 1 |
| Afturvíst | 6 | 3 | 5 |
| Burturfallin | 3 | 5 | 9 |
| Afturkallað | 2 | 2 | 4 |
| Uppafturtøka | 1 | 1 | 3 |
| Kærufreist | 3 | 2 | 3 |
| Broytt | 0 | 3 | 3 |
| Partvís broytt | 0 | 1 | 0 |
| **Í alt** | **44** | **39** | **64** |

Um hugt verður eftir samlaðu avgreiðsluni hjá Føroya Kærustovni av skatta- og avgjaldsmálum, so sæst, at 36 av teimum 64 kærumálunum eru staðfest av Føroya Kærustovni. Tað er sostatt beint yvir helvtin av málunum, ið eru staðfest, og er hetta í tráð við undanfarin ár.

# TAKS

## AVGREIÐSLAN AV MÁLUM HJÁ TAKS

| | 2021 | 2022 | 2023 |
|---|---|---|---|
| Staðfest | 26 | 18 | 36 |
| Broytt | 0 | 1 | 2 |
| Partvís broytt | 0 | 1 | 0 |
| Afturvíst | 5 | 2 | 5 |
| Burturfallin | 3 | 6 | 9 |
| Burturvíst | 2 | 3 | 1 |
| Afturkallað | 2 | 2 | 3 |
| Kærufreist | 3 | 2 | 3 |
| Annað | 1 | 1 | 3 |
| **í alt** | **42** | **36** | **62** |

Av teimum 64 kærunum, ið eru avgreiddar í 2023, eru 62 kærur um avgerðir hjá TAKS. Størsti parturin av avgerðunum hjá TAKS eru staðfestar, 5 eru afturvístar og tvær eru broyttar.

# AKSTOVAN

Føroya Kærustovnur avgreiddi onga kæru um avgerð hjá Akstovuni í 2023.

# KOMMUNALU SKATTAKÆRUNEVNDIRNAR

Føroya Kærustovnur avgreiddi eina kæru um avgerð hjá kommunalu skattakærunevndunum, sum varð broytt. Ein onnur kæra var um avgerð hjá kommunalari skattakærunevnd, henda fall burtur.

# VIÐGERÐARTÍÐIN

Samlaða miðal málsviðgerðartíðin í 2023 var beint yvir 1 ár.

Viðgerðartíðin fevnir um alla málsgongdina, eisini tilgongdina, har myndugleikar og partar í málinum upplýsa málið fyri Føroya Kærustovni. Hetta kann vera ein sera drúgv tilgongd, sum ikki endiliga altíð skyldast viðurskifti, sum Føroya Kærustovnur beinleiðis hevur ræði á. Hetta kann vera við til at leingja munandi um samlaðu viðgerðartíðina hjá Føroya Kærustovni. Føroya Kærustovnur hevur fleiri ferðir áður víst á, at gamla skipanin, har ávísar avgerðir ella partar av málum, fyrst skuldu kærast til kommunala skattakærunevnd, meðan aðrar avgerðir ella partar av málum, kundu kærast beinleiðis til Føroya Kærustovn, var sera óheppin og longdi ofta munandi um samlaðu viðgerðartíðina. Í 2023 eru serliga nógv mál, sum hava verið í bíðistøðu hjá Føroya Kærustovni, av tí at partar av málunum hava bíðað eftir endaligari viðgerð hjá eitt nú kommunalari skattakærunevnd, og er hetta beinleiðis orsøkin til, at viðgerðartíðin hjá Føroya Kærustovni á skattaøkinum í 2023 er óvanliga drúgv. Nevnast kunnu 11 mál, har viðgerðartíðin var serliga long orsaka av at málini vóru í bíðistøðu. Verða hesi málini tikin burturfrá, var miðal málsviðgerðartíðin í 2023 6,5 mánaðar, ið verður mett at vera á einum góðum støði fyri hetta slagið av málum, ið ofta eru sera trupul og umfatandi.

# SERLIGA ÁHUGAVERD MÁL

## Toll av ferðagóðsi

### Mál nr. 23/15759

Føroya Kærustovnur hevði mál til viðgerðar, har kært var um, at TAKS hevði tikið avgerð um at kærarin skal rinda toll av vøru, ið kærarin hevði við sær sum ferðandi til Føroya.

Kærarin hevði keypt vøru á internetinum, ið varð send til adressu í Keypmannahavn og hevði tikið hana við sær sum ferðandi á flogvøllinum úr Keypmannahavn til Føroya.

Kærarin vísti á, at virðið á vøruni var undir kr. 2.500 u/mvg og sostatt undir markinum fyri, hvat ferðandi til Føroya kann flyta inn tollfrítt og avgjaldsfrítt.

TAKS vísti á, at flutningskostnaðurin, ið var lagdur afturat keypsprísinum, tá ið kærarin hevði bílagt vøruna, skal takast við samlaða kostnaðinum av vøruni, og tá ið samlaði kostnaðurin av vøruni var hægri enn kr. 2.500 u/mvg, kundi vøran ikki flytast inn toll- og avgjaldsfrítt.

Føroya Kærustovnur avgjørdi at staðfesta avgerðina hjá TAKS. Avgerðin varð grundað á, at sambært § 11, stk. 3, í tolllógini, skal flutningskostnaður leggjast afturat fakturaprísinum, og sambært § 4 í kunngerð um, hvat ferðandi kunnu flyta inn tollfrítt og avgjaldsfrítt til Føroya, kann vøra, ið hevur hægri virði enn kr. 2.500 u/mvg ikki flytast inn til Føroya tollfrítt og avgjaldsfrítt.

## Sýtt umsókn um frítøku at rinda í arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnin

### Mál nr. 23/09718

Føroya Kærustovnur hevði mál til viðgerðar, har kært var um, at TAKS hevði tikið avgerð um at sýta kæraranum frítøku at rinda í arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnin.

Kærarin hevði søkt um frítøku at rinda arbeiðsmarknaðareftirlønargjald sambært § 2, stk. 7, í løgtingslóg nr. 39 frá 7. mai 1991 um arbeiðsmarknaðareftirlønargrunn, har tað er ásett, at persónar ið eru fevndir av norðurlendska sáttmálanum um sosiala trygd, hava møguleika at vera frítiknir at rinda í grunnin.

Kærarin vísti á, at hann rindar 8% av sínari bruttoløn í Danmark til arbejdsmarkedsbidrag og at hann tí eigur at vera frítikin at rinda arbeiðsmarknaðareftirlønargjald í Føroyum.

Føroya Kærustovnur avgjørdi at staðfesta avgerðina hjá TAKS. Avgerðin varð grundað á, at heimild er ikki í lógini um arbeiðsmarknaðareftirlønargrunn at geva kæraranum frítøku at rinda gjald til arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnin, tí at kærarin er ikki fevndur av norðurlendska sáttmálanum um sosiala trygd, tí at ásetingarnar í norðurlendska sáttmálanum um sosiala trygd eru bert galdandi millum Føroyar, Danmark og Grønland øðrumegin og Finland, Ísland, Noreg og Svøríki hinumegin, og harvið ikki galdandi innanhýsis millum Føroyar og Danmark.

## Ferðaendurgjald fyri koyring frá bústaði til arbeiðspláss

### Mál nr. 23/10898

Føroya Kærustovnur hevði mál til viðgerðar, har kært var um, at TAKS hevði tikið avgerð um, at kærarin hevði rætt til kr. 14,50 í stuðli um dagin til ferðaútreiðslur.

TAKS vísti á, at fjarstøðan millum bústað og arbeiðsstað skal roknast sambært mátingum hjá Landsverk, og at fjarstøðan millum bygdirnar sambært Landsverk er 24,87 km. ein veg, sum gevur kr. 14,50 um dagin.

Kærarin var ósamd við TAKS um, at kærarin hevði rætt til kr. 14,50 í stuðli til ferðaútreiðslur heldur enn kr. 21,50. Kærarin vísti á, at fjarstøðan frá bústaði hennara til arbeiðsplássið og heimaftur er meira enn 50 km tilsamans, og at hon tí hevur rætt til kr. 21,50 um dagin.

Føroya Kærustovnur avgjørdi at staðfesta avgerðina hjá TAKS. Avgerðin varð grundað á, at í § 2, stk. 4, í løgtingslóg nr. 93 frá 6. juni 1997 um stuðul til ferðaútreiðslur, er ásett, at vegastrekkir verða uppgjørd sambært uppmátingum av vegalongdum millum bygdir hjá Landsverk, og sambært uppmátingum hjá Landsverki eru tað 24,87 km millum bygdirnar, og harvið 49,74 km báðar vegir, ið hevur við sær, at kærarin sambært § 2, stk. 2, nr. 2, hevur rætt til kr. 14,50 um dagin í stuðli til ferðaútreiðslur.

# 6/LESTRARSTUÐULSMÁL

## VIÐGERÐARØKIÐ

Føroya Kærustovnur viðger kærur um avgerðir hjá Studna eftir løgtingslóg nr. 36 frá 3. mai 2007 um lestrarstuðul.

## MÓTTIKIN MÁL

Talið av kærum í lestrarstuðulsmálum er vanliga ikki serliga høgt, og hetta árið er ikki nakað undantak. Í 2023 komu 9 kærur inn, ið er nakað meira enn í 2021 og 2022, har talið lá ávikavist á 5 og 0.




## AVGREIDD MÁL

Kærustovnurin hevði 3 fundir um lestrarstuðulsmál í 2023 og avgreiddi 4 mál. Øll málini vóru innkomin í 2023. Í 2021 vórðu 6 mál avgreidd, ímeðan 2 mál vórðu avgreidd í 2022.



## AVGREIÐSLAN

Av teimum 4 málunum, ið vórðu avgreidd hetta árið, vóru 2 mál staðfest, 1 mál broytt og í einum málið var loyvt frávik frá kærufreist.




## BÝTIÐ AV AVGREIDDUM MÁLUM

| | 2021 | 2022 | 2023 |
|---|---|---|---|
| Ferðastuðul til lesandi uttanlands | 2 | 0 | 1 |
| Lestrarstuðul í Føroyum | 4 | 2 | 2 |
| Lestrarstuðul uttanfyri Føroyar | 0 | 0 | 1 |
| Lestrarstuðul uttanfyri norðurlond | 0 | 0 | 0 |
| **Í alt** | **6** | **2** | **4** |

## VIÐGERÐARTÍÐIN

Í 2023 var miðal viðgerðartíðin í lestrarstuðulsmálum undir 2,5 mánaðir. Viðgerðartíðin er sostatt farin eitt vet niður sammett við undanfarna árið, har hon var knappar 3 mánaðir.

Ein miðal viðgerðartíð á 2,5 mánaðar er stutt tíð, tá hugsað verður um, at viðgerðartíðin verður roknað, frá kæran er innkomin á Kærustovnin, til hon er avgreidd á fundi. Tað vil siga, at tíðin, sum fer til ummælis, hoyring og innheintan av upplýsingum annars eisini er partur av viðgerðartíðini.

# SERLIGA ÁHUGAVERT MÁL

## Sýtt lestrarstuðul
### Málstal 23/14142

Upplýst var í málinum, at Studni í 2021 hevði játtað kærara lestrarstuðul til eina tvey ára útbúgving uttan fyri Føroyar, tí hann leyk treytina í § 2, stk. 2, nr. 1 í lóg um lestrarstuðul, sum ásetur, at "Stuðul til lestur uttan fyri Føroyar verður eftir umsókn veittur teimum, ið eru lestrarvirkin og lúka treytirnar í stk. 1 í hesi grein, og hava búð í Føroyum í minsta lagi tvey av teimum seinastu trimum árunum beint undan lestrarbyrjan."

Kærari søkti síðan í 2023 um lestrarstuðul til eina bachelor útbúgving. Kært varð um, at Studni hesaferð sýtti kæraranum lestrarstuðul, vísandi til, at kærari ikki longur leyk ásetingarnar um tilknýti til Føroyar, sbrt. § 2, stk. 2, nr. 1 í lóg um lestrarstuðul.

Studni metti, at talan var um tvær ymiskar útbúgvingar, og tí leyk kærarin ikki longur ásetingarnar um tilknýti til Føroyar sbrt. § 2, stk. 2, nr. 1 í lóg um lestrarstuðul.

Føroya Kærustovnur broytti avgerðina hjá Studna. Kærustovnurin viðmerkti, at Kærustovnurin var ósamdur í tulkingini, um at kravið um tilknýti til Føroyar í § 2, stk. 2, nr. 1 í lóg um lestrarstuðul, skal vera tengt av, hvørt talan er um ymiskar útbúgvingar, ella útbúgvingar, sum hava tilknýti hvør til aðra. Harumframt sæst einki í hvørki lógini ella viðmerkingunum til lógina, ið stuðlar undir, at ásetingin skal tulkast soleiðis, at borgarin missur sítt neyðuga tilknýti til Føroya, um farið verður undir eina nýggja útbúgving. Hetta óansæð um talan er um eina nýggja útbúgving, ið er framhald av upprunaligu útbúgvingini, ella um talan er um eina útbúgving, ið einki tilknýti hevur til upprunaligu útbúgvingina.

Føroya Kærustovnur viðmerkti at enda, at tá reglurnar ikki eru heilt greiðar, so má í hesum føri tulkast til fyrimuns fyri kæraran.

# 7/LENDISMÁL

## VIÐGERÐARØKIÐ

Kærunevndin í lendismálum viðger kærur um:

- Avgerðir hjá kommununum eftir býarskipanarlógini ella byggisamtykt.
- Avgerðir hjá kommununum eftir 1881-lógini um ognartøku.
- Avgerðir hjá Umhvørvisstovuni eftir lóg um matrikulering og sundurbýti.
- Avgerðir hjá Umhvørvisstovuni eftir lóg um tinglýsing.
- Avgerðir eftir lógini um eigaraíbúðir.
- Avgerðir eftir lógini um bygging.

## NÝGGJ MÁL

Í 2023 vóru 19 kærur móttiknar. Hetta er nakað minni enn í 2022 og 2021, tá ávikavist 25 og 23 kærur komu inn.

Eins og undanfarin ár vóru flestu kærurnar um bygging. 10 av kærunum snúðu seg um bygging og 5 um matrikulering og sundurbýti. 4 kærur snúðu seg um viðurskifti, sum fella uttan fyri virkisøkið hjá Kærustovninum.




## AVGREIDD MÁL

Í 2023 avgreiddi Føroya Kærustovnur 27 lendismál.

Av hesum varð 1 avgreitt av løgfrøðingi á Føroya Kærustovni sambært § 4 í lóg um Føroya Kærustovn. 9 mál vóru avgreidd av stjóranum, tveimum løgfrøðingum og einum serkønum. Í teimum førum, har serkønur var við í viðgerðini, var talan um byggimál, har byggikøn vóru mett neyðug fyri viðgerðina. 17 mál vórðu avgreidd av stjóranum og tveimum løgfrøðingum.

Tilsamans 27 mál vórðu soleiðis avgreidd í 2023, sum er áleið tað sama undanfarna ár, tá 28 mál vórðu avgreidd. Í 2021 vórðu 24 mál avgreidd.

Í 2023 vóru flestu avgreiddu málini um matrikulering og sundurbýti, og vóru tey 12 tali. Harumframt vóru 11 mál um bygging, 1 mál um tinglýsing og 3 mál vóru um annað, sum fellur uttan fyri virkisøkið hjá Kærustovninum.

## BÝTIÐ AV AVGREIDDUM MÁLUM

| | 2021 | 2022 | 2023 |
|---|---|---|---|
| Byggimál | 14 | 14 | 11 |
| Matrikulering/sundurbýti | 6 | 7 | 12 |
| Tinglýsing | 0 | 0 | 1 |
| Ognartøka | 2 | 1 | 0 |
| Annað | 2 | 6 | 3 |
| **í alt** | **24** | **28** | **27** |




## AVGREIÐSLAN

| | 2021 | 2022 | 2023 |
|---|---|---|---|
| Staðfest | 11 | 9 | 13 |
| Broytt | 2 | 4 | 3 |
| Heimvíst | 2 | 3 | 4 |
| Burturvíst | 5 | 8 | 4 |
| Burturfallin | 1 | 0 | |
| Steðgandi virknað | 2 | 3 | 1 |
| Kæra afturkallað | 1 | 0 | 1 |
| Kærufreist | 0 | 1 | 1 |
| **í alt** | **24** | **28** | **27** |



### VIÐGERÐARTÍÐIN

Miðal viðgerðartíðin í 2023 var knappar 7 mánaðir. Hetta er nakað longri enn bæði endanfarnu árini, tá miðal viðgerðartíðin var góðar 5 mánaðir. Ein miðal viðgerðartíð á 7 mánaðir má tó metast góð fyri hetta slag av málum. Í hesum sambandi skal havast í huga, at viðgerðartíðin verður roknað frá tí degi, málið er innkomið til Kærustovnin, til tað er avgreitt á fundi, og sostatt skulu atlit m.a. takast til krøvini til málsupplýsing og partshoyring.

# SERLIGA ÁHUGAVERD MÁL

## Kommuna noktar at broyta byggisamtykt

### Mál nr. 23/07476

Kært varð um at kommuna hevur sýtt at broyta byggisamtykt fyri ávíst øki, frá landbúnaðarøki til sethúsaøki.

Kærustovnurin vísti á, at viðvíkjandi broyting og/ella góðkenning av byggisamtyktum verður víst til §§ 1-9 í býarskipanarlógini. Talan er eina heimild hjá kommununi, sum planleggingarmyndugleika, at gera býarskipanarligar reglur (byggisamtyktir) fyri alla kommununa, ella serstakar byggisamtyktir fyri ávís økir í kommununi. Hesar byggisamtyktir skulu síðan góðkennast av landsstýrismanninum, eftir omanfyri nevndu reglum. Mett verður, at tað kemur ikki undir heimildarøkið hjá Kærustovninum at viðgera, ella taka avgerð um hvørt tað var rætt av kommununi, sum planleggingarmyndugleika, at sýta at broyta byggisamtyktina í hesum føri.

Í hesum sambandi varð eisini víst til § 2, stk. 1 í lóg um Føroya Kærustovn, har ásett er, at Føroya Kærustovnur er kærumyndugleiki fyri fyrisitingarligar avgerðir, tá ið tað er ásett í løgtingslóg ella við heimild í løgtingslóg. Harumframt tekur Føroya Kærustovnur avgerð í málum, tá ið tað er ásett í løgtingslóg. Kærustovnurin avgjørdi at avvísa hesa kæruna.

## Mist útsýnið

### Mál nr. 22/22667

Kært verður um bygging hjá granna, tí ætlaða byggingin tekur útsýnið frá kæraranum. Kærustovnurin viðmerkti viðvíkjandi útsýni, at um bygt verður í tráð við ásetingarnar í byggisamtyktini, hevur grannin (kærarin) sum útgangsstøði ikki krav upp á eitt ávíst útsýni. Kærustovnurin metir ikki, at heimild er at áleggja kommununi at heita á kærda um at venda sethúsunum ein ávísan veg, ella at minka hæddina á húsunum, sum kærarin førir fram, tí talan er um eittplanshús, sum halda seg væl innanfyri hæddarásetingarnar í byggisamtyktini. Hóast givna byggiloyvið ikki er í stríð við reglurnar í byggisamtyktini, verður tó mett, at ætlaða byggingin hevur ávísar ampar, so sum mist útsýni og ljósviðurskifti, sum eiga at viðføra, at hann, sum nærmasti granni, átti at fingið partsstatus, og sostatt verið hoyrdur, áðrenn byggiloyvið varð givið, vísandi til § 18 í fyrisitingarlógini. Føroya Kærustovnur avgjørdi, at heimvísa málið til nýggja viðgerð hjá kommununi.

# 8/VINNUMÁL

Tann 1. juli 2022 varð Vinnukærunevndin avtikin og virkisøkið flutt til Føroya Kærustovn. Hetta hevur millum annað havt við sær, at kæra send kærunevndini, sum ikki varð avgreidd áðrenn 1. juli 2022, er viðgjørd og avgreidd av Føroya Kærustovni.

## VIÐGERÐARØKIÐ

Í vinnumálum viðger Føroya Kærustovnur kærur um:

- Avgerðir hjá Akstovuni eftir ferðslulógini.
- Avgerðir hjá Arbeiðseftirlitinum eftir lóg um arbeiðsumhvørvi, lóg um kavaravinnu og kavaraútgerð og lóg um spreingievni og spreingiarbeiði v.m.
- Avgerðir hjá Umhvørvisstovuni eftir lóg um framleiðslu, flutning og veiting av ravmagni, og eftir kunngerð um vápnaprógv.
- Avgerðir hjá Fjarskiftiseftirlitinum eftir lóg um fjarskifti.
- Avgerðir hjá Heilsufrøðiligu Starvsstovuni eftir lóg um matvørur v.m., lóg um aling av fiski, lóg um djórasjúkur, lóg um djóralæknavirksemi og lóg um innflutning og hald av vandamiklum djórum o.ø.
- Avgerðir hjá Kappingarráðnum eftir lóg um kapping og anordning om ikrafttræden for Færøerne af lov om betalinger.
- Avgerðir hjá Landsverk eftir lóg um landsvegir og lóg um ognartøku og avhendan til flogferðsluendamálflogferðsluendamál.
- Avgerðir hjá Posteftirlitinum eftir lóg um postvirksemi.
- Avgerðir hjá Skráseting Føroya eftir partafelagslógini, smápartafelagslógini, ársroknskaparlógini, lóg um ávís vinnurekandi virkir, lóg um vinnurekandi grunnar, lóg um vinnu, lóg um góðkendar grannskoðarar og grannskoðaravirkir, og lóg um fyribyrgjandi tiltøk ímóti hvítvaski av vinningi og fígging av yvirgangi (Hvítvasklógin).
- Avgerðir hjá Sjóvinnustýrinum eftir kunngerð um loðsprógv og loðsfrítøkuskjal.
- Avgerðir hjá Tryggingareftirlitinum eftir lóg um tryggingarvirksemi og lóg um fyribyrgjandi tiltøk ímóti hvítvaski av vinningi og fígging av yvirgangi (Hvítvasklógin).
- Avgerðir hjá Umhvørvisstovuni eftir kunngerð um vápnaprógv.
- Harumframt viðger Føroya Kærustovnur kærur eftir lóg um skyldu arbeiðsgevarans at fráboða løntakaranum treytirnar fyri setanarviðurskiftinum.

## NÝGGJ MÁL

Í 2023 eru 21 kærur latnar Føroya Kærustovni á vinnuøkinum. Hetta er nakað fleiri enn í 2022, tá 16 kærur vórðu latnar og eitt vet færri enn í 2021 og 2020, tá 25 kærur vórðu latnar Vinnukærunevndini.

Flestu móttiknu kærurnar hetta árið eru um avgerðir hjá Heilsufrøðiligu Starvsstovuni og eru tær 6 í tali. Afturat teimum komu 5 kærur inn um avgerðir hjá Akstovuni, 4 mál um setanarprógv, 2 kærur um avgerðir hjá Kappingarráðnum, 3 kærur um avgerðir hjá Umhvørvisstovuni og 1 kæra um avgerð hjá Tryggingareftirlitinum.

Býtið av kærum á málsøkir er rættiliga líkt undanfarnum árum, har tað eru móttiknar flestar kærur um avgerðir hjá Heilsufrøðiligu Starvsstovuni. Í ár eru 6 kærur móttiknar um avgerðir hjá Heilsufrøðiligu Starvsstovuni og hetta er sama tal av kærum um avgerðir hjá Heilsufrøðiligu Starvsstovuni sum í 2022.

Største økingin í móttiknum kærum, er um avgerðir hjá Akstovuni, har tað í 2023 eru móttiknar 5 kærur, meðan tað í 2022 bara varð móttikin 1 kæra um avgerð hjá Akstovuni.




## AVGREIDD MÁL

| | 2021 | 2022 | 2023 |
|---|---|---|---|
| Akstovan | 3 | 2 | 3 |
| Fjarskiftiseftirlitið | 0 | 0 | 0 |
| Heilsufrøðiliga Starvsstovan | 9 | 9 | 8 |
| Landsdjóralæknin | 1 | 0 | 0 |
| Landsverk | 0 | 3 | 0 |
| Setanarprógv | 2 | 2 | 1 |
| Skráseting Føroya | 1 | 0 | 0 |
| Umhvørvisstovan | 6 | 5 | 1 |
| Kappingareftirlitið | 0 | 0 | 3 |
| Tryggingareftirlitið | 0 | 0 | 3 |
| Annað | 0 | 1 | 0 |
| **Í alt** | **22** | **22** | **19** |

Tiknar vórðu 19 avgerðir í 2023 og er hetta eitt vet færri enn í 2020 og 2021, tá 22 avgerðir vórðu tiknar.

Kærustovnurin avgreiddi í alt 19 avgerðir á vinnuøkinum í 2023. Av hesum varð 1 avgerð avgreidd av løgfrøðingi á Føroya Kærustovni sambært § 4, stk. 4 í lóg um Føroya Kærustovn. Talan varð um mál um avvísing vegna ov seint latna kæru. 7 av avgerðunum vórðu avgreiddar av stjóranum og tveimum løgfrøðingum sambært § 5, stk. 1 í lóg um Føroya Kærustovn. Í 11 av avgerðunum – meira enn helminginum av øllum avgerðunum í 2023 – varð serkunnleiki mettur neyðugur og varð Kærustovnurin tískil settur við stjóranum, tveimum løgfrøðingum á Føroya Kærustovni og einum serkønum við serkunnleika mettur neyðugur fyri viðgerðina, sambært § 5, stk. 3 í lóg um Føroya Kærustovn.

Málini á vinnuøkinum eru ógvuliga ymisk, og eru tey eisini oftast sera umfatandi og trupul. Tískil eru hetta mál, har tað javnan er neyðugt at nýta serkunnleika í viðgerðini av málinum. Hetta sæst aftur, av tí at tað í 11 av 19 avgerðum í 2023, hevur verið mett neyðugt, at nýta serkøn í viðgerðini av málunum. Serkunnleikin sum hevur verið mettur neyðugur í 2023, er eisini sera ymiskur og fevnir hann millum annað um serkunnleika innan búskaparfrøði, tryggingarfrøði og roknskap, umframt at bæði djóralækni og advokatur eisini hava verið nýttir sum serkøn í vinnumálum í 2023.

## AVGREIÐSLAN

| | 2021 | 2022 | 2023 |
|---|---|---|---|
| Staðfest | 8 | 8 | 6 |
| Lutvíst staðfest | 1 | 1 | 1 |
| Broytt | 1 | 0 | 3 |
| Heimvíst | 2 | 1 | 1 |
| Ógildað | 1 | 1 | 1 |
| Avvíst | 4 | 4 | 4 |
| Burturfallin | 0 | 2 | 1 |
| Afturkallað | 0 | 0 | 0 |
| Kærufreist | 1 | 0 | 0 |
| Steðgandi virknaður | 0 | 2 | 1 |
| Viðhald (setanarprógv) | 2 | 1 | 0 |
| Uppafturtøka | 1 | 1 | 1 |
| Annað | 1 | 1 | 0 |
| **í alt** | **22** | **22** | **19** |

# AKSTOVAN

### 3 AVGREIDD MÁL

Tvey av málunum snúðu seg um avgerðir um endurnýggjan av koyrikorti, harav onnur avgerðin varð staðfest av Føroya Kærustovni, meðan hin avgerðin varð heimvíst til nýggja viðgerð hjá Akstovuni. Triðja málið snúði seg um avgerð hjá Akstovuni um gjald í sambandi við sýn av akfari. Kærarin afturkallaði ta kæruna.



# HEILSUFRØÐILIGA STARVSSTOVAN

## 8 AVGREIDD MÁL




### 6 av málunum snúðu seg um ymisk viðurskifti í sambandi við alilóggávuna

Tvey av málunum snúðu seg um avgerð hjá Heilsufrøðiligu Starvsstovuni um góðkenning av rakstrarætlan í samband við útsetu av smolti á aliøki. Føroya Kærustovnur broytti avgerðirnar hjá Heilsufrøðiligu Starvsstovuni vísandi til, at Heilsufrøðiliga Starvsstovan ikki hevði grundgivið nóg væl fyri, hví rakstrarætlanin sannlíkt ikki fór at eydnast. Føroya Kærustovnur metti ikki, at víst varð á nøktandi grundarlag fyri, at ætlaða rakstrarætlanin sannlíkt ikki fór at eydnast.

Eitt mál snúði seg um avgerð hjá Heilsufrøðiligu Starvsstovuni um at nokta útsetu av rognkelsum á aliøkjum grundað á høgt felli hjá rognkelsunum og vantandi átøk til tess at minka um fellið hjá rognkelsunum. Føroya Kærustovnur ógildaði avgerðina hjá Heilsufrøðiligu Starvsstovuni vísandi til, at Heilsufrøðiliga Starvsstovan ikki hevði upplýst málið á nøktandi hátt, áðrenn ein fyrisitingarlig avgerð varð tikin, vísandi til m.a. grundleggjandi fyrisitingarligu meginregluna um upplýsingarskyldu – offisialprinsippið.

Eitt mál snúði seg um avgerð hjá Heilsufrøðiligu Starvsstovuni um góðkenning av smoltstøð við týðandi avmarkingum viðvíkjandi kørum og hallum í smoltstøðini. Føroya Kærustovnur valdi lutvíst at staðfesta avgerðina og lutvíst at ógildað avgerðina viðvíkjandi serligum pørtum av hallunum, vísandi til, at Heilsufrøðiliga Starvsstovan hevði tikið avgerð í málinum uttan á nøktandi hátt at hava upplýst málið til fulnar og at tað varð ein týðandi málsviðgerðarligur mangul.

Eitt mál snúði seg um avgerð hjá Heilsufrøðiligu Starvsstovuni um at áleggja felagið at beina burtur tilfar og útgerð í samband við aling. Føroya Kærustovnur vísti burtur kæruni, vísandi til, at avgerðin hjá Heilsufrøðiligu starvsstovuni varð ikki at meta sum ein fyrisitingarlig avgerð, ið einvegis ásetti, hvat er, ella skal vera rætt í tí ítøkiliga førinum. Mett varð hinvegin, at talan varð um boð sum vórðu givin fyri at tryggja, at krøv, sum ásett vórðu í alilógini ella í reglum, givnar við heimild í lógini, vórðu hildin. Slík boð vórðu ikki at meta sum ein fyrisitingarlig avgerð fevnd av málsræðnum hjá Føroya Kærustovni og tískil avvísti Føroya Kærustovnur kæruna.

Seinasta máli á aliøkinum snúði seg um kæru um avgerð hjá Heilsufrøðiligu Starvsstovuni um ikki at viðgera umsókn um loyvi at ala laks uttanfyri 12 fjórðingar. Kærarin hevði latið Føroya Kærustovni kæruna meira enn 10 mánaðar eftir, at Heilsufrøðiliga Starvsstovan hevði tikið avgerðina, har starvsstovan samstundis hevði givið rætta kæruvegleiðing um, at kærast kundi innan 4 vikur. Føroya Kærustovnur avvísti kæruni, tá kært varð eftir, at kærufreistin varð farin.

### Eitt mál snúði seg um avgerð hjá Heilsufrøðiligu Starvsstovuni viðvíkjandi djóravælferð

Málið snúði seg um, at Heilsufrøðiliga Starvsstovan hevði tikið avgerð um, at brot varð framt á djóravælferðarlógina. Í sambandi við eftirlitsvitjan hevði Heilsufrøðiliga Starvsstovan givið boð um, at persónur við fakligum førleika skuldi boðsendast, har viðkomandi skuldi taka støðu til viðgerð og møguliga avlíving av rossum. Føroya Kærustovnur avvísti kæruni vísandi til, at talan var ikki um eina fyrisitingarliga avgerð, sum kundi kærast til Føroya Kærustovn.

### Eitt mál snúði seg um avgerð hjá Heilsufrøðiligu Starvsstovuni um at sýta fyri innflutningi av hundi

Málið snúði seg um, at Heilsufrøðiliga Starvsstovan hevði tikið avgerð um, at sýta umsókn um innflutning av hundi av slagnum Olde English Bulldog. Føroya Kærustovnur staðfesti avgerðina hjá Heilsufrøðiligu Starvsstovuni vísandi til, at mett varð, at Heilsufrøðiliga Starvsstovan hevði gjørt eina ítøkiliga meting sum grundarlag ikki varð fyri at seta til síðis.

# UMHVØRVISSTOVAN

## 1 AVGREITT MÁL

### Málið snúði seg um avgerð hjá Umhvørvisstovuni um royndarloyvi í sambandi við sjóvarfalsorku

Málið snúði seg um, at Umhvørvisstovan hevði tikið avgerð um, at veita royndarloyvi í sambandi við sjóvarfalsorku. Kommuna hevði kært avgerðina sjálva, og ávísar treytir í royndarloyvinum, til Føroya Kærustovn. Føroya Kærustovnur avvísti kæruni, vísandi til, at kærarin ikki varð at meta sum partur í málinum og tískil ikki hevði kærurætt.

# SETANARPRÓGV

## 1 AVGREITT MÁL

Talan varð um mál um uppafturtøku av áður avgreiddum máli um setanarprógv. Føroya Kærustovnur tók uppaftur áður avgreitt mál til nýggja viðgerð, eftir áheitan frá parti í málinum, vísandi til, at upprunaliga avgerðin varð tikin á skeivum faktuellum grundarlagi. Føroya Kærustovnur uppafturtók tí málið til nýggja viðgerð.

# TRYGGINGAREFTIRLITIÐ

## 3 MÁL AVGREIDD




### Tvey av málunum snúðu seg um avgerð hjá Tryggingareftirlitinum um ikki at góðkenna tveir nevndarlimir í eftirlønargrunni

Málið snúði seg um, at Tryggingareftirlitið ikki vildi góðkenna tveir nevndarlimir í einum eftirlønargrunni. Føroya Kærustovnur staðfesti avgerðirnar hjá Tryggingareftirlitinum vísandi til, at grundarlag ikki varð fyri, at seta til síðis metingarnar ella avgerðirnar hjá Tryggingareftirlitinum.

### Eitt mál snúði seg um avgerð hjá Tryggingareftirlitinum at sýta alment innlit

Málið snúði seg um, at Tryggingareftirlitið hevði sýtt miðli alment innlit í fundarfrágreiðingar o.a. Miðilin kærdi avgerðina hjá Tryggingareftirlitinum at sýta alment innlit til Føroya Kærustovn. Føroya Kærustovnur staðfesti avgerðina hjá Tryggingareftirlitinum at sýta alment innlit vísandi til m.a. serligar ásetingar um tagnarskyldu í tryggingarlógini.

# KAPPINGARRÁÐIÐ

### 3 AVGERÐIR




### Tvær av avgerðunum høvdu tilknýti hvør til aðra, tá onnur snúði seg um steðgandi virknað og hin um sjálvt kærumálið, sum snúði seg um avgerð hjá Kappingarráðnum eftir kappingarlógini

Hetta málið snúði seg um, at Kappingarráðið hevði tikið avgerð um, at ein partur hevði misnýtt sína ráðandi støðu, við at brúka prísklemmu í stríð við § 11, stk. 1 í kappingarlógini.

Føroya Kærustovnur tók fyrst avgerð um at geva kæruni steðgandi virknað, meðan kæran bleiv viðgjørd av Føroya Kærustovni. Avgerðin varð í høvuðsheitum grundað á, at kærurætturin varð mettur gagnleysur, um kæran ikki fekk steðgandi virknað.

Í mun til sjálvt málið, so avgjørdi Føroya Kærustovnur at broyta avgerðina hjá Kappingarráðnum, millum annað vísandi til, at tað við støði í upplýsingunum í málinum, ikki bar til at staðfesta, at parturin hevði ráðandi støðu á marknaðinum og at hetta tískil varð ein treyt sambært § 11, stk. í kappingarlógini, sum ikki varð lokin. Føroya Kærustovnur broytti sostatt avgerðina hjá Kappingarráðnum.

### Eina málið snúði seg um, at Kappingarráðið hevði tikið avgerð um, at partur hevði missnýtt sína ráðandi marknaðarstøðu

Málið snúði seg um, at Kappingarráðið hevði tikið avgerð um, at partur hevði missnýtt sína ráðandi marknaðarstøðu. Føroya Kærustovnur staðfesti avgerðina hjá Kappingarráðnum, at parturin hevði misnýtt sína ráðandi marknaðarstøðu sambært § 11, stk. 1 í kappingarlógini.

## VIÐGERÐARTÍÐIN

Miðal viðgerðartíðin fyri øll avgreidd mál á vinnuøkinum í 2023 varð umleið 8 mánaðir. Hetta er eitt vet longri enn viðgerðartíðin tey bæði undanfarnu árini, har viðgerðartíðin hevur verið umleið 5 ½ mánaðir. Longra viðgerðartíðin í 2023 skyldast í høvuðsheitum, at einkult mál hava havt óvanliga langa tilgongd at upplýsa málini til fulnar.

Vísast má tó á, at havandi í huga hvussu ymisk, trupul og umfatandi vinnumálini vanliga eru, so er ein viðgerðartíð áljóðandi 8 mánaðir sera rímiligt. Havast skal eisini í huga, at atlit eisini má takast til, at tað javnan eru sera drúgvar ummælis- og hoyringstilgongdir í samband við at upplýsa málini.

Nevnast kann tó hinvegin, at 2023 er nakað sermerkt, av tí at tað í 2023 hava verið tvey sera umfatandi og trupul kappingarmál til viðgerðar hjá Føroya Kærustovni. Eitt sum ofta sermerkir kappingarmálini er, at freistirnar at upplýsa, viðgerða og avgreiða málini, ofta eru ógvuliga stuttar. Havandi í huga, hvussu trupul, rúgvismikil og serlig hesi málini ofta eru, so hevur Føroya Kærustovnur javnan víst á yvirfyri myndugleikanum, at órímiliga stuttu viðgerðarfreistirnar burdu verið endurskoðaðar. Tá talan eisini ofta er um mál, sum Kappingareftirlitið/Kappingarráðið hevur arbeitt við í langa tíð, so tykist ikki rímiligt at freistirnar í sambandi við kæruviðgerðina av málini hjá Føroya Kærustovni skulu vera so óvanliga stuttar.

# 9/PSYKIATRISK SJÚKLINGAMÁL

## NEVNDIN

Tann 1. juli 2023 varð Psykiatriska sjúklingakærunevndin avtikin og økið flutt til Føroya Kærustovn. Hetta merkir sostatt, at árið 2023 á hesum økinum hevur verið tvíbýtt. Fyrra hálvárið 2023 hevur Psykiatriska sjúklingakærunevndin verið virkin, meðan virkisøkið hjá Psykiatrisku sjúklingakærunevndini seinna hálvárið 2023, hevur ligið hjá Føroya Kærustovni.

## NEVNDIN

Fyrra hálvárið í 2023 varð Psykiatriska sjúklingakærunevndin mannað soleiðis:

- Nella Festirstein, løgfrøðingur og forkvinna í nevndini
- Jeaneth Løkjá, lækni
- Oda Jóhansdóttir, nevndarlimur

## SETAN AV FØROYA KÆRUSTOVNI

Føroya Kærustovnur verður vanliga settur at viðgera psykiatrisk sjúklingamál við tveimum løgfrøðingum og tveimum serkønum, sambært § 5, stk. 3 í lóg um Føroya Kærustovn.

## VIÐGERÐARØKIÐ

Kærast kann til Føroya Kærustovn um persónur í sambandi við innlegging á psykiatrisku deild verður útsettur fyri tvingsil.

Tvingsilsinntrivini eru til dømis tvingsilsinnlegging, tvingsilsafturhald á deildini, tvingsilsviðgerð, brúk av tvingsilsfastspenning og brúk av kropsligari megi (t.e. at starvsfólk halda sjúklinginum føstum).

Rættartrygdin hjá sjúklingunum er vard við at ein týðandi partur av psykiatrilógini inniheldur eina røð av ásetingum, ið hava til endamál at avmarka ella, um til ber, at fyribyrgja nýtslu av tvingsli.

Føroya Kærustovnur skal hava tikið avgerð sum skjótast, og innan 7 gerandisdagar aftaná kæran er móttikin, tá talan er um tvingsilsviðgerð. Føroya Kærustovnur viðger kærur um allar tvingsilsfyriskipanir á psykiatrisku deild.

Allir sjúklingar, sum eru undir tvingsilsfyriskipanum, fáa tilnevnt ein sjúklingaráðgeva. Uppgávan hjá sjúklingaráðgevanum er at vitja sjúklingin, og hava støðugt samband við hann. Ráðgevin skal leiðbeina og geva ráð í øllum viðvíkjandi innlegging, uppihaldi og viðgerð á psykiatrisku deild. Harumframt skal ráðgevin hjálpa sjúklinginum við møguligari kæru og vera hjástaddur, tá ið kæran verður viðgjørd á fundi.

Skipanin við sjúklingaráðgevum skal tryggja, at psykiatriskir sjúklingar, sum vera lagdir undir tvingsil, fáa rætt til stuðul og hjálp, bæði menniskjaliga og rættarliga frá óheftum persóni, ið hevur neyðuga førleikan.

## NÝGGJ MÁL

Í 2023 vórðu 12 kærur latnar ávikavist Psykiatrisku sjúklingakærunevndini og Føroya Kærustovni. Hetta er nakað væl meira enn undanfarna ár, tá ið bert 4 kærur vórðu latnar Psykiatrisku sjúklingarkærunevndini. Sammett við 2021 er talið í ár tó áleið tað sama sum í 2021, tá ið 13 kærur vóru móttiknar.

Hvør kæra inniheldur ofta kærur um fleiri ymisk tvingsilsinntriv og so var eisini hetta árið. Í teimum 12 kærunum varð kært um tilsamans 22 tvingsilsinntriv.




## AVGERÐIRNAR

| | 2021 | 2022 | 2023 |
|---|---|---|---|
| Tvingsilsinnlegging | 6 | 0 | 6 |
| Tvingsilsfastspenning | 0 | 1 | 2 |
| Tvingsilsafturhald | 7 | 2 | 7 |
| Bráðfeingis sissandi heilivág | 1 | 0 | 1 |
| Fasthaldan | 0 | 0 | 0 |
| Tvingsilsviðgerð | 1 | 2 | 3 |
| Tvungin uppfylging | 0 | 0 | 0 |
| Annað (uttanfyri heimildarøki) | 2 | 0 | 3 |
| **Í alt** | **17** | **5** | **22** |

Tiknar vóru 12 avgerðir í 2023 av ávikavist Psykatrisku sjúklingakærunevndini og Føroya Kærustovni.

Í tveimum førum varð kæran avvíst, tí hon fall uttanfyri heimildarøkið hjá ávikavist Psykiatrisku sjúklingakærunevndini og Føroya Kærustovni. Viðgjørt vóru 19 tvingsilsinntriv harav 18 vóru góðkend og 1 ikki góðkent.




## SJÚKLINGARÁÐGEVAR

Sjúklingaráðgevar hava verið tilnevndir 35 ferðir í 2023, sum er tætt við tað sama sum í 2023, tá ið sjúklingaráðgevar vórðu tilnevndir 33 ferðir. Tilnevningin av sjúklingaráðgevum fylgir talinum av tvingsilsfyriskipanum, sum eisini eru fleiri í 2023 enn í 2022.



## TVINGSILSFYRISKIPANIR Á PSYKIATRISKA DEPLINUM Í 2023

| | 2021 | 2022 | 2023 |
|---|---|---|---|
| Tvingsilsinnlegging | 14 | 17 | 20 |
| Tvingsilsafturhald | 10 | 14 | 14 |
| Tvingsilsfastspenning | 8 | 13 | 21 |
| Tvingsilsviðgerð | 3 | 4 | 11 |
| Verjutiltøk | 0 | 4 | 1 |
| Persónlig vernd | 0 | 0 | 0 |
| Sissandi heilivágur | 10 | 20 | 24 |
| Fasthaldan | 0 | 5 | 1 |
| **Í alt** | **45** | **77** | **92** |

Psykiatriski depilin hevur upplýst fyri Føroya Kærustovni, at frá 1. januar til 31. desember 2023 hava 92 tvingsilsfyriskipanir verið tilsamans í mun til 2022, har tað vóru 77 tvingsilsfyriskipanir.

Tølini frá Psykiatriska deplinum vísa, at tvingsilsfyriskipanirnar í 2023 eru nakað fleiri enn í 2022, og munandi fleiri enn í 2021. Størsti vøksturin sæst innan fyri tvingsilsfastspenning, tvingsilsviðgerð og sissandi heilivág.

Talið av tvingsilsfyriskipanum á Psykiatriska deplinum sæst tó ikki aftur í talum av kærum um psykiatrimál. Hóast tvingsilsinntrivini á psykiatriska deplinum vóru tvífaldað í talið í 2023 í mun til 2021, varð kærutalið á leið tað sama hesi bæði árini, ávikvist 12 og 13. Ein lítil munur varð tó í talinum av inntrivum, sum kærurnar snúðu seg um hesi árini, ávikavist 22 og 17 inntriv. Hóast tvingsilsinntrivini á psykiatriska deplinum vórðu rættuliga nógv fleiri í 2022 enn í 2021, varð kærutalið sera lágt hetta árið, tær 4 kærurnar snúðu seg um 5 inntriv.

Tað ber soleiðis illa til at meta um virksemið á Psykiatriska deplinum, út frá kærunum sum koma til Føroya Kærustovn.

## VIÐGERÐARTÍÐIN

Miðal viðgerðartíðin fyri kærurnar í psykiatriskum kærumálum er 6 dagar í 2023, og er hetta ein sera góð viðgerðartíð.

# 10/SKULDARUMSKIPANARMÁL

Føroya Kærustovnur viðger umsóknir um umskipan av almennari skuld, sí løgtingslóg nr. 29 frá 8. apríl 2005 um umskipan av landsskatta-, mvg- og tollskuld v.m. hjá fólki.

## NÝGGJ MÁL

Í 2023 vórðu 16 umsóknir móttiknar. Hetta er áleið tað sama sum undanfarnu árini, tá ávikavist 14 og 16 umsóknir komu inn.




## MÁLINI UPPBÝTT EFTIR SKULDARSLAGI

| | 2021 | 2022 | 2023 |
|---|---|---|---|
| Ymisk skuld | 7 | 1 | 4 |
| Skattaskuld | 0 | 5 | 6 |
| Mvg | 2 | 2 | 1 |
| Vinnulán og veðhaldslán | 0 | 0 | 0 |
| Lestrarlán | 1 | 0 | 1 |
| Rentur | 6 | 6 | 4 |
| AM-gjald | 0 | 0 | 0 |
| **Í alt** | **16** | **14** | **16** |

## AVGREIDD MÁL

Føroya kærustovnur hevur í 2023 avgreitt 18 mál.

Av hesum fullu 3 burtur, áðrenn Kærustovnurin tók støðu til umsóknina. 2 vóru avgreidd av stjóra og tveimum løgfrøðingum (hesi mál vórðu avvíst, tí upplýsingar manglaðu). 13 mál vóru avgreidd av stjóranum, trimum løgfrøðingum og einum serkønum við kunnleika til roknskaparviðurskifti.




## AVGREIDD MÁL UPPBÝTT EFTIR SKULDARSLAGI

| | 2021 | 2022 | 2023 |
|---|---|---|---|
| Ymisk skuld | 1 | 2 | 3 |
| Skattaskuld | 7 | 3 | 4 |
| Mvg | 2 | 3 | 2 |
| Vinnulán og veðhaldslán | 0 | 0 | 0 |
| Lestrarlán | 1 | 0 | 1 |
| Rentur | 5 | 4 | 8 |
| **Í alt** | **16** | **12** | **18** |

## MÁLINI VÓRÐU AVGREIDD SOLEIÐIS

| | 2021 | 2022 | 2023 |
|---|---|---|---|
| Full ella lutvís eftirgeving | 4 | 4 | 5 |
| Veita gjaldsskáa/avdráttur settur niður | 0 | 1 | 3 |
| Steðga rentutilskriving | 5 | 2 | 0 |
| Víst til Skiftirættin, ella privata loysn | 0 | 1 | 2 |
| Umsókn ikki gingin á møti | 3 | 3 | 3 |
| Burturfallin mál | 4 | 1 | 3 |
| Avvíst uppl. mangla | 0 | 0 | 2 |
| **Í alt** | **16** | **12** | **18** |

## MÁLINI VÓRÐU AVGREIDD SOLEIÐIS




## EFTIRGIVIN SKULD

Føroya Kærustovnur eftirgav tilsamans umleið kr. 976.105 í 2023. Skuldin er uppbýtt soleiðis:

| | |
|---|---|
| Rentuskuld | 525.551 kr. |
| Landsskattur | 417.374 kr. |
| Mvg-skuld | 33.162 kr. |
| AM-gjald | 18 kr. |

Tað er torført at seta upp nágreinilig tøl um eftirgevingar, tí ymiskar umstøður gera, at tølini ofta broytast eitt sindur. Rentuskuldin broytist t.d. alla tíðina og tølini kunnu sostatt broytast eitt sindur, frá tí umsóknin kom inn, til avgerðin varð tikin av nevndini.

Tølini fyri eftirgevingar eru munandi lægri í 2023 enn í 2022, tá samlaða eftirgevingin var kr. 2.057.799.

Í málunum, har Kærustovnurin hevur samtykt ikki at ganga umsóknini á møti, hevur talan í nógvum førum verið um mál, har skuldin er lítil sæð í mun til ogn og inntøku hjá persóninum, ella at umsøkjarin hevur havt frívirði í fastari ogn. TAKS hevur eisini í nøkrum førum veð fyri skuldini.

Í málunum, har umsøkjarin er biðin um at venda sær til skiftirættin, hevur talan verið um mál, har almenna skuldin hevur verið lítil í mun til privatu skuldina, ella at umsøkjarin hevur skuld til fleiri ymiskar kreditorar, og tá er best um ein samla loysn verður gjørd upp á alla skuldina.

Í 2023 kom ein umsókn inn har partur av umsóknini snúði seg um eftirgeving av eftirløn av B-intøku. Føroya Kærustovnur burturvísti henda partin av umsóknini, vísandi til at skyldan at gjalda inn til egna eftirløn er ikki partur av eftirgevingarheimildini hjá Føroya Kærustovni, tí talan er um eina kravda uppsparing, har eftirlønarskatturin, sambært § 12, stk. 2, 1. pkt. í eftirlønarlógini (Løgtingslóg nr. 49/2013) verður trektur av kravda inngjaldinum og latin kommununum, sí § 12, stk. 2, 4. pkt. í eftirlønarlógini.

Í hesum sambandi verður viðmerkt, at skyldan at gjalda inn til egna eftirløn av B-inntøku er vaksin nógv seinastu árini, og sostatt kann henda upphædd gerast lutfalsliga stór í mun til samlaðu almennu skuldina. Mett verður, at hetta við tíðini kann fáa ta avleiðing, at tað í nøkrum málum kann verða trupult at fáa eina samlaða loysn.

## VIÐGERÐARTÍÐIN

Miðal viðgerðartíðin í 2023 var góðar 5 mánaðir og má sigast at vera góð fyri hetta slagið av málum. Havast skal í huga, at upplýsingar skulu innheintast frá TAKS og umsøkjara umframt, at kommunur skulu taka avgerð um teirra part av skuldini, áðrenn Kærustovnurin kann gera sína niðurstøðu. Til samanberingar kann nevnast, at miðal viðgerðartíðin í 2022 var 5½ mánaðir og í 2021 á leið 4½ mánaðir. Viðgerðartíðin á hesum øki hevur annars fyrr ofta ligið á umleið 8 mánaðum.

# 11/BARNAVERNDARMÁL

## SKIFTIÐ FRÁ HØVUÐSBARNAVERNDARNEVNDINI

Føroya Løgting hevur við løgtingslóg nr. 147 frá 25. november 2021 um Føroya Kærustovn, tikið avgerð um, at taka av kærunevndirnar og flyta virkisøki teirra til Føroya Kærustovn. Broytingin er gjørd líðandi í tíðarskeiðnum frá 1. januar 2022 til 1. januar 2024, tá allar nevndir eru tiknar av og heimildir teirra eru fluttar til Føroya Kærustovn.

Tann 1. juli 2023 varð Høvuðsbarnaverndarnevndin avtikin og virkisøkið flutt til Føroya Kærustovn. Hetta merkir sostatt, at árið 2023 á barnaverndarøkinum hevur verið tvíbýtt. Fyrra hálvárið 2023 hevur Høvuðsbarnaverndarnevndin verið virkin, meðan virkisøkið hjá Høvuðsbarnaverndarnevndini seinna hálvárið 2023, hevur ligið hjá Føroya Kærustovni.

## HØVUÐSBARNAVERNDARNEVNDIN

Fyrra hálvárið í 2023 varð
Høvuðsbarnaverndarnevndin mannað soleiðis:

- Birita Ludvíksdóttir, løgfrøðingur og forkvinna
- Rókur av Fløtum Jespersen, sálarfrøðingur
- Ingvør Justinussen, barnasakkøn

## SETAN AV FØROYA KÆRUSTOVNI

Føroya Kærustovnur verður vanliga settur at viðgera barnaverndarmál við trimum løgfrøðingum og tveimum serkønum, sambært § 5, stk. 3 í lóg um Føroya Kærustovn.

## VIÐGERÐARØKIÐ

Høvuðsbarnaverndarnevndin viðger mál um:

- Umsorganaryvirtøku
- Samveru
- Familjuviðgerð
- Bráðfeingisavgerðir

## UMSORGANARYVIRTØKA OG LONGD FYRISKIPAN

Við ársenda í 2023 vóru í alt 86 umsorganaryvirtikin børn í Føroyum. Av hesum vóru 61 í fosturheimi, 24 børn vóru á stovni í Føroyum, og 1 barn var á stovni uttanlands.

Við ársenda í 2023 vóru harumframt 15 ung í aldrinum 18 – 21 í longdari fyriskipan. Av hesum vóru 9 ung í fosturheimi, 5 ung á stovni ella stovnslíknandi fyriskipan í Føroyum og ein ung/-ur á stovni uttanlands.

## TAL AV UMSORGANARYVIRTIKNUM BØRNUM OG UNGUM Í LONGDARI FYRISKIPAN




Tað eru sostatt eins nógv børn, ið vóru umsorganaryvirtikin við árslok 2023 samanborið við 2022, og 6 fleiri ung/ungur, ið vóru í longdari fyriskipan við árslok 2023 samanborið við 2022.

## BÚSTAÐUR HJÁ UMSORGANARYVIRTIKNUM BØRNUM



### BÚSTAÐUR HJÁ UNGUM Í LONGDARI FYRISKIPAN




# VIRKSEMIÐ Í 2023

### MÓTTIKIN TILMÆLI OG AVGERÐIR TIL GÓÐKENNINGAR




Tilsamans 111 mál barnaverndarmál vórðu móttikin og viðgjørd av Føroya Kærustovni í 2023. Talið er munandi hægri enn í 2022, tá 86 mál vórðu viðgjørd. Talan er tó um færri mál enn í 2021, tá ávikavist 129 vórðu viðgjørd.

Málini snúgva seg millum annað um umsorganaryvirtøku av børnum, um samveru millum somu børn og foreldur teirra ella onnur, um inn- og útskrivan av stovni og um góðkenning av bráðfeingis avgerðum hjá barnaverndarnevndunum. Harumframt verða nevndu fyriskipanir regluliga endurskoðaðar.

Talið av málum samsvarar hvørki við talið av avgerðum ella talið av børnum, tí sama mál kann fevna um bæði umsorganaryvirtøku og samveru við ymiskar partar. Harumframt kann tilmæli viðvíkjandi einum barni verða lagt fyri Føroya Kærustovn til støðutakan fleiri ferðir um árið.

Í 2023 vóru tilsamans 262 avgerðir tiknar. Hetta eru eisini munandi fleiri enn í 2022, tá talið av avgerðum var 176. Í 2021 vóru til 272 avgerðir tiknar.

Tiknu avgerðirnar í 2023 snúðu seg um 89 børn. Talið av børnum var til samanberingar 74 í 2022 og 104 í 2021.

Samanumtikið boða hagtølini frá 2023 frá, at virksemið av barnaverndarmálum í 2023 hevur verið munandi størri enn í 2022, men ikki heilt eins stórt sum í 2021. Tað kunnu verða fleiri orsøkir til, at virksemið er skiftandi frá ári til ár.

Millum annað vóru 16 tilmæli um umsorganaryvirtøku (fyrstu ferð) send Føroya Kærustovni í 2023, og er hetta á støði við tølini frá árunum 2019-2021. Í 2022 vóru einans 4 nýggj tilmæli um umsorganaryvirtøku send Høvuðsbarnaverndarnevndini.

Ein onnur orsøk er, at tað er ymiskt, nær málini eiga at verða endurskoðað av Føroya Kærustovni. Tað verður ásett í ítøkiligu avgerðunum, nær barnaverndartænastan skal leggja málið fyri Føroya Kærustovn til endurskoðan. Hendan endurskoðanarfreistin er í flestu førum 1 ella 2 ár. Í 2023 vóru 38 tilmæli um endurskoðan av umsorganaryvirtøku viðgjørd, samanborið við 27 og 49 tilmæli í ávikavist 2022 og 2021.

## AVGERÐIR




## TAL AV BØRNUM Í MÓTTIKNUM TILMÆLUM




## ALDURSBÝTI Á BØRNUM Í MÓTTIKNUM TILMÆLUM




## AVGERÐIR Í MUN TIL TILMÆLI



## FYRISKIPANIR




## UMSORGANARYVIRTØKA

Allar avgerðir hjá Føroya Kærustovni eru grundaðar á tilmæli frá barnaverndartænastunum kring landið. Føroya Kærustovnur hevur ikki møguleika at taka mál upp av sínum eintingum.

Tá Føroya Kærustovnur avger, at barn skal verða umsorganaryvirtikið, fevnir avgerðin eisini um, hvørt barnið skal setast í fosturfamilju ella á stovn.

Í 2023 vórðu 13 børn umsorganaryvirtikin fyri fyrstu ferð. Harumframt varð 1 barn (ið frammanundan var umsorganaryvirtikið), somuleiðis umsorganaryvirtikið í mun til eitt av foreldrunum, ið ikki áður hevði havt lut í foreldramyndugleikanum.

Av hesum 14 børnunum vórðu 5 børn sett í fosturfamilju, meðan 9 vórðu sett á stovn.

Aldursbýtið á børnunum var frá 2 til 16 ár.

Í 12 av teimum 14 málunum vóru børnini yngri enn 15 ár. Av hesum bleiv umsorganaryvirtøkan í 6 málum framd við samtykki frá foreldramyndugleikanum/-unum. Í 4 málum gav annar av báðum foreldramyndugleikunum samtykki til umsorganaryvirtøkuna, og í 2 málum bleiv umsorganaryvirtøkan framd uttan samtykki frá foreldramyndugleikanum/-unum.

Í 2 av teimum 14 málunum vóru børnini 15 ár ella eldri. Í einum máli góvu foreldramyndugleikarnir og barnið samtykki til umsorganaryvirtøkuna. Í hinum málinum gav einans barnið samtykki til umsorganaryvirtøkuna.

Í tveimum málum avgjørdi Føroya Kærustovnur ikki at taka undir við tilmælunum um umsorganaryvirtøku av børnunum, tí grundarlag ikki var fyri umsorganaryvirtøkuni. Ein umsorganaryvirtøka av einum barni er ein sera inntrívandi avgerð. Av hesi orsøk kann ein umsorganaryvirtøka einans fremjast, um tað er neyðugt, og tá ið fyribyrgjandi fyriskipanirnar ikki verða mettar at kunna skapa eitt nøktandi úrslit fyri barnið.

Børn kunnu verða varandi umsorganaryvirtikin, um tað má metast at vera sannlíkt, at foreldrini varandi ikki eru før fyri at geva barninum nøktandi umsorgan, ella um barnið, eftir at tað hevur verið til fosturs í minst 5 ár, hevur fingið so sterkt tilknýti til hesi, at tað er av stórum týdningi og best fyri barnið, at tað verður verandi hjá fosturforeldrunum.

4 børn blivu varandi umsorganaryvirtikin í 2023. Viðvíkjandi einum av hesum børnunum blivu tvær avgerðir tiknar um varandi umsorganaryvirtøku. Føroya Kærustovnur tók fyrst avgerð um varandi umsorganaryvirtøku, men Føroya Rættur heimvísti

málið til nýggja viðgerð, tí rætturin metti, at tørvur var á fleiri kanningum. Eftir, at kanningarnar vóru framdar, bleiv nýggj avgerð tikin um varandi umsorganaryvirtøku.

Í øllum málunum var avgerðin um varandi umsorganaryvirtøku grundað á sterka tilknýtið til fosturheimið. Í 3 málum var varandi umsorganaryvirtøkan somuleiðis grundað á, at foreldrini varandi sannlíkt ikki eru før fyri at geva barninum nøktandi umsorgan.

Í einum føri bleiv tann varandi umsorganaryvirtøkan framd við samtykki frá foreldramyndugleikanum.

## Á STOVN UTTANLANDS

Føroya Kærustovnur ansar eftir, at barn verður sett á rættan samdøgursstovn. Um einki nøktandi tilboð finst í Føroyum, kann barn verða sett á stovn uttanlands.

Eitt umsorganaryvirtikið barn og ein ungur persónur í longdari fyriskipan vórðu sett á stovn uttanlands í 2023 – bæði í Danmark. Í báðum førum vóru hesi frammanundan umsorganaryvirtikin/í longdari fyriskipan við uppihaldi á stovni uttanlands. Einki barn/ung bleiv sostatt fyri fyrstu ferð sett á stovn uttanlands í 2023.

## SAMVERA

Føroya Kærustovnur ásetur samveru við umsorganaryvirtikin børn.

Barnið hevur rætt til samveru við bæði foreldur uttan mun til foreldramyndugleika, og harumframt kann barnið hava ásetta samveru við ommur, abbar, systkin, fyrrverandi fosturforeldur ella onnur, ið standa tí nær.

Hóast dentur verður lagdur á, at umsorganaryvirtikin børn kenna sína familju og sítt upphav, kann samvera í serligum førum verða noktað foreldrunum í styttri ella longri tíðarskeið. Hetta hendi í 6 avgerðum í 2023. Í einum føri tók Føroya Kærustovnur ikki undir við tilmælinum hjá barnaverndartænastuni um at nokta samveru millum barn og foreldur.

Tess eldri og meira búgvið barnið er, tess størri ávirkan kann barnið hava á, hvussu samveran verður skipað.

## FAMILJUVIÐGERÐ

Í barnaverndarlógini er heimild fyri, at Føroya Kærustovnur kann innskriva familjur til samdøgurs- ella dagviðgerð á stovni undir landinum.

Familjuviðgerð er ein fyribyrgjandi fyriskipan, har foreldur við menningarmøguleikum kunnu fáa munagóða hjálp í rættari tíð, umframt at møguleiki er fyri at kanna førleikarnar hjá foreldrunum nærri. Talan er tí um eina fyribyrgjandi fyriskipan, ið kann forða fyri, at støðan hjá barninum ella í familjuni versnar, og sum kann vera við til at forða fyri, at neyðugt verður við enn meira inntrívandi fyriskipanum.

Í undanfarnum árum blivu børn og familjur regluliga innskrivað til viðgerð á Familjudeplinum sum samdøgurstilboð, men síðan januar 2022 er einki barn ella familja innskrivað.

Føroya Kærustovnur kann einans innskriva børn og familjur til familjuviðgerð, um ein barnaverndartænasta sendir Føroya Kærustovni eitt tilmæli um hetta. Føroya Kærustovnur hevur einki tilmæli móttikið síðan januar 2022.

Føroya Kærustovnur er ikki blivin kunnaður um serlig viðurskifti viðvíkjandi Familjudeplinum.

Landsstýrismaðurin í Almannamálum svaraði tó í skrivligum fyrispurningi (Nr. 52-042/2022) tann 5. oktober 2022, at *"Almannamálaráðið hevur saman við Almannaverkinum sett eina tilgongd í verk í mun til at fáa greiðu á, hvussu virksemið á familjudeplinum skal skipast framyvir. Henda tilgongdin fevnir eisini um starvsfólkahópin, sum í verandi løtu eru flutt í onnur størv í Almannaverkinum".*

## AVGERÐIR UM UNG YVIR 18 ÁR, SUM HALDA FRAM Í FYRISKIPAN

Umsorganaryvirtøka heldur uppat, tá tann ungi fyllir 18 ár.

Føroya Kærustovnur kann tó avgera, at tann ungi kann halda fram í longdari fyriskipan undir barnaverndarlógini, um tørvur er á stuðli eina tíð aftrat, fyri at tann ungi skal kunna megna eina sjálvstøðuga vaksnamannatilveru. Tað er til dømis ikki óvanligt, at ung halda fram í longdari fyriskipan, til tey hava lokið miðnámsprógv.

Fyriskipanin kann bert halda fram, um tann ungi ynskir tað. Somuleiðis endar longda fyriskipanin beinanvegin, um tann ungi ynskir tað.

Longd fyriskipan undir barnaverndarlógini eigur bert at verða longd, um tað er sannlíkt, at tann ungi fer at megna eina sjálvstøðuga vaksnamannatilveru. Um tað til dømis er sannlíkt, at tann ungi fer at hava varandi tørv á bústovni undir Almannaverkinum, verður tann ungi ikki settur í longda fyriskipan, men eigur at fáa tilboð eftir lógini um almannatrygd og tænastur.

Í 2023 vórðu 10 avgerðir tiknar um longda fyriskipan.

## BRÁÐFEINGIS AVGERÐIR OG AVGERÐIR UM LÆKNAKANNING OG VIÐGERÐ

Barn kann verða tikið úr heiminum uttan rættarúrskurð, um vandi er fyri, at tað verður skatt av at vera verandi í heiminum. Eisini kann foreldrum verða noktað at fáa barn heimaftur, um vandi er fyri, at barnið verður skatt, um tað fer heim. Somuleiðis kann ein bráðfeingis avgerð verða tikin, um eitt barn er uttan umsorgan, tvs. at eingin er at taka sær av barninum.

Tað er barnaverndarnevndin í økinum, ið tekur bráðfeingis avgerðina. Avgerðin skal leggjast fyri Føroya Kærustovn til góðkenningar beinanvegin, og í seinasta lagi 2 yrkadagar eftir at hon er tikin.

Um bráðfeingis avgerð verður góðkend av Føroya Kærustovni, kann avgerðin í mesta lagi standa við í 4 mánaðir. Í tí tíðarskeiðinum eigur barnaverndartænastan at kanna umstøðurnar hjá barninum og foreldrunum, soleiðis at støða kann verða tikin til, hvørt barnið eigur at fara heim aftur, ella um tað eigur at verða umsorganaryvirtikið.

Harumframt kann barnaverndarnevndin – uttan rættarúrskurð - taka avgerð um, at barn skal til hóskandi kanningar og viðgerð, um orsøk er at halda, at eitt barn hevur eina lívshóttandi ella álvarsama sjúku ella skaða, er fyri kynsligum ágangi ella øðrum harðskapi, og um samtykki ikki fæst frá foreldramyndugleikanum ella barni, ið er fylt 15 ár, til at barnið kemur til kanningar ella viðgerð.

Í 2023 viðgjørdi Føroya Kærustovnur 4 bráðfeingis avgerðir. Av hesum blivu 3 avgerðir góðkendar, og ein avgerð bleiv ikki góðkend.

Eingin avgerð um kanning og viðgerð av einum barni bleiv viðgjørd.

## BARNAVERNDARØKINI

Føroyar eru deildar í 8 barnaverndarøki við tilhoyrandi barnaverndartænastum:

- Barnaverndartænastan fyri Tórshavnar kommunu
- Barnaverndartænastan fyri Norðoyggjar er samstarv millum: Fugloyar-, Klaksvíkar-, Kunoyar-, Viðareiðis-, og Hvannasunds kommunur
- Barnaverndartænastan fyri Suðuroynna
- Barnaverndartænastan fyri Eysturkommunu og Fuglafjarðar kommunu
- Barnaverndartænastan við Skálafjørðin er samstarv millum Nes-, Runavíkar- og Sjóvar kommunur
- Barnaverndartænastan í VEKS er samstarv millum Vestmanna-, Eiðis-, Kvívíkar- og Sunda kommunur
- Barnaverndartænastan fyri Vága- og Sørvágs kommunur
- Barnaverndartænastan fyri Sandoyar og Skúvoyar kommunur

Tað eru barnaverndartænasturnar, ið leggja mál um t.d. umsorganaryvirtøku og ásetan av samveru fyri Føroya Kærustovn, ið síðan tekur endaliga avgerð í málunum.

Tilsamans vóru 86 børn umsorganaryvirtikin, og 15 børn vóru í longdari fyriskipan við ársenda 2023. Ábyrgdin av málunum viðvíkjandi hesum børnunum var soleiðis deild millum barnaverndarøkini:






Í 2023 móttók Føroya Kærustovnur 111 tilmæli og bráðfeingis avgerðir til góðkenningar. Hesi vóru býtt soleiðis millum barnaverndartænasturnar:




Føroya Kærustovnur tók 262 avgerðir í 2023. Hesar avgerðir vóru soleiðis býttar millum barnaverndartænasturnar:




Sum tað sæst er sera stórur munur á, hvussu stórt virksemi er í teimum ymisku barnaverndartænastunum – bæði í mun til tilmæli og avgerðir.

Ein orsøk kundi verið tann stóri munurin á fólkatalinum í teimum átta barnaverndarøkjunum. Tað er tó greitt, at hóast hædd verður tikin fyri muninum í fólkatalinum, so er sera stórur munur á virkseminum í teimum ymisku barnaverndarøkjunum. Tað er tí trupult at vísa á nakra ávísa orsøk til, hví virksemi er størri í ávísum barnaverndarøkjum í mun til onnur.

## VIÐGERÐARTÍÐ

Í 2023 gingu í miðal 20 dagar frá, at tilmæli varð móttikið á Føroya Kærustovni, til avgerð varð tikin í málinum. Tá eru atlit ikki tikin til, at mál til dømis eru móttikin í ferium, ella at foreldur av ymsum orsøkum hava ynskt mál útsett. Viðgerðartíðin var tann sama í 2023 í mun árini frammanundan.

Tá mál móttikið á Føroya Kærustovni, verður tað kannað og viðgjørt av løgfrøðingi, áðrenn tað verður lagt fyri á fundi, har viðkomandi partar hava møguleika at møta. Føroya Kærustovnur tekur síðan avgerð í málinum, og verður skrivliga avgerðin send viðkomandi pørtum skjótast til ber. Føroya Kærustovnur verður settur 3. hvørja viku at viðgera barnaverndarmál.

Tá Føroya Kærustovnur móttekur eina bráðfeingis avgerð frá einari barnaverndartænastu til góðkenningar, tekur Føroya Kærustovnur í flestu førum støðu til bráðfeingis avgerðina sama dag ella dagin eftir.

## KÆRUR

Kærur um avgerðir hjá Føroya Kærustovni í barnaverndarmálum verða lagdar fyri Føroya Rætt. Í 2023 blivu 7 avgerðir hjá Føroya Kærustovni kærdar til Føroya Rætt.

Kæran kann fevna um alla avgerðina ella ein part av avgerðini. Til dømis kunnu foreldur kæra avgerð um samveru, hóast tey ikki kæra avgerð um umsorganaryvirtøkuna.

Tá kæra er móttikin, leggur Føroya Kærustovnur málið fyri Føroya Rætt. Føroya Rættur tilnevnir kæraranum advokat í sambandi við rættarmálið.

Úrslitið av viðgerðunum hjá Føroya Rætti av avgerðunum hjá Føroya Kærustovni var soleiðis:

| | 2021 | 2022 | 2023 |
|---|---|---|---|
| Avgerð staðfest | 10 | 7 | 4 |
| Avgerð ikki staðfest | 0 | 0 | 1 |
| Avgerð lutvíst staðfest | 1 | 0 | 1 |
| Kæra ikki viðgjørd enn | 0 | 0 | 2 |

Tveir dómar, avsagdir av Føroya Rætti í 2023, blivu skotnir inn fyri Eystara Landsrætt av kærara. Hvørgin av hesum eru enn blivnir viðgjørdir av Eystara Landsrætti

# 12/ARBEIÐSLOYSISSKIPANARMÁL OG BARSILSSKIPANARMÁL

Tann 1. januar 2023 varð Kærunevndin hjá Arbeiðsloysisskipani og Barsilsskipani tikin av og virkisøkið flutt til Føroya Kærustovn. Avtøkan av kærunevndini hevur millum annað havt við sær, at kæra send Kærunevndini, sum ikki varð avgreidd áðrenn, er viðgjørd av Føroya Kærustovni.

Í sambandi við umskipan av Føroya Kærustovni verður serkøn ráðgeving í Arbeiðsloysisskipnarmálum og Barsilsskipanarmálum veitt av persónum við serligum kunnleika til arbeiðsmarknaðarmál, ein umboðandi løntakarar og ein umboðandi arbeiðsgevarar. Í arbeiðsloysisskipanarmálum taka tey serkønu avgerðir saman við Føroya Kærustovni.

## VIÐGERÐARØKIÐ

Mál, sum verða bólkað sum arbeiðsloysisskipanarmál eru avgerðir hjá Arbeiðsloysisskipani eftir løgtingslóg nr. 113 frá 13. juni 1997 um arbeiðsloysistrygging og arbeiðsávísing.

Mál, sum verða bólkað sum barsilsskipanarmál, eru avgerðir hjá Taks eftir løgtingslóg nr. 48 frá 3. apríl 2001 um barsilsskipan.

## NÝGGJ MÁL

Í 2023 komu 3 nýggjar kærur inn í arbeiðsloysisskipanarmálum og barsilsskipanarmálum.

Kærurnar í arbeiðsloysisskipanarmálum snúðu seg um sýtan av arbeiðsloysisútgjaldi og um afturgjaldskrav fyri útgjald móttikið av órøttum, meðan kæran í barsilsskipanarmálum snúði seg um skeivt útgjald úr barsilsskipanini.

Kærurnar í 2023 snúðu seg eins í 2022 um ymisk viðurskifti, ið hava við útgjald úr teimum báðum skipanum at gera.



## AVGREIDD MÁL

Føroya Kærustovnur avgreiddi 4 mál í 2023. Av hesum málum var 1 innkomið í 2022, meðan 1 mál bleiv avgreitt sum varð móttikið í 2023, áðrenn kærunevndin bleiv avtikin.




## BÝTIÐ AV AVGREIDDUM MÁLUM

| | 2023 |
|---|---|
| Barsilspeningur sýttur | 1 |
| Skeivt útgjald úr barsilsskipani | 1 |
| Ov nógv útgoldin arbeiðsloysisstuðul | 1 |
| Arbeiðsloysisstuðul sýttur | 1 |
| **Í alt** | **4** |

## AVGREIÐSLAN

Føroya Kærustovnur hevur avgreitt 4 kærur hetta árið. Av hesum vórðu 3 avgerðir staðfestar, og ein kæra fall burtur.




## VIÐGERÐARTÍÐIN

Í 2023 var miðal viðgerðartíðin í arbeiðsloysisskipanarmálum góðar 4½ mánaðir og í barsilsskipanarmálum varð miðal viðgerðartíðin góðar 5½ mánaðir. Hetta eru longri miðal viðgerartíðir enn undanfarna ár, 1½ mánaða longri á báðum økjum.

Tó skal sigast, at viðgerðartíðir á 4½ til 5½ mánaðir mugu metast at verða á góðari leið, tí viðgerðartíðin verður roknað frá tí degi, málið er innkomið til Kærustovnin, til tað er avgreitt á fundi, og sostatt skulu atlit m.a. takast til krøvini til málsupplýsing og partshoyring.

# SERLIGA ÁHUGAVERT MÁL

## Arbeiðsloysisstuðul – afturgjaldskrav
### Mál nr. 23/05791

ALS kravdi arbeiðsloysisstuðul afturgoldnan, tí kærari ikki hevði rætt til útgoldna stuðulin.

Arbeiðsloysisstuðul varð játtaður frá august 2022, og hevði kærari annars fingið vegleiðing um treytir og skyldur. Sambært sáttmála varð kærari settur í starv frá 1. august 2022, og upplýsti kærari ALS, at hann hevði fingið starv frá oktober 2022.

Kærari greiddi frá, at hann arbeiddi frá august, men at byrja við uttan fígging, og hevði enn ikki fingið útgoldið ein part av lønini fyri august. Kærari metti ikki, at nakað var goymt í málinum ella tagt var um umstøður, sum høvdu týdning fyri arbeiðsloysisstuðulin.

Føroya Kærustovnur vísti á, at tá kærari hevði havt setanartilknýti til arbeiðsplássi frá august 2022 vóru treytirnar fyri útgjald ikki loknar, sbrt. § 14 í ALS lógini og §§ 1 og 2 í útgjaldskunngerðini. Víst var á, at hóast kærari ikki hevði fingið útgoldið løn beinanvegin, so er tað ikki avgerandi fyri rættindi til arbeiðsloysisstuðul, tá talan er um viðurskifti millum arbeiðstakara og arbeiðsgevara.

Føroya Kærustovnur avgjørdi at staðfesta avgerðina grundað á, at kærari hevði givið skeivar upplýsingar og tagt um umstøður, sum hava viðført, hann móti betri vitandi hevur móttikið arbeiðssloysistuðul, sum hann ikki hevur rætt til. ALS hevur tí heimild at krevja arbeiðsloysisstuðulin afturgoldnan, sbrt. § 28 í ALS lógini.

# 13/TVINGSILSNEVNDIN

## NEVNDIN

Tá avgerðir skulu takast í Tvingsilsnevndini luttaka í flestu málum formaðurin og tveir serkønir nevndarlimir. Formaðurin ger av, hvørjir av serkønu nevndarlimunum skulu luttaka í nevndarviðgerðini. Í serligum førum kann avgerð takast um, at fleiri enn tveir serkønir limir luttaka í viðgerðini. Skeiðið hjá formanni, varaformanni og serkønu limunum gongur til 1. januar 2024, tá virkisøkið verður flutt til Føroya Kærustovn sambært § 16, stk. 5 í løgtingslóg um Føroya Kærustovn.

Í nevndini sita í løtuni:
- Eli Thorsteinsson, advokatur og formaður
- Súsanna Nordendal, løgfrøðingur og varalimur fyri formannin

Harumframt eru fleiri serkønir limir útnevndir av avvarðandi yrkisfeløgum, sum formaðurin kann velja ímillum til at viðgera ymisku málini.

## VIÐGERÐARØKIÐ

Tvingsilsnevndin hevur víttfevnandi málsøki, ið fevnir um bæði nógv og ymisk mál. Virksemið hjá Tvingsilsnevndini er í høvuðsheitum skipað í Løgtingslóg nr. 73 frá 25. mai 2020 um tvingsil og onnur inntriv í sjálvsavgerðarrættin (tvingsilslógin). Tvingsilsnevndin tekur bæði støðu til, um tilmæli um tvingsilsinntriv frá kommunum og Almannaverkinum kunnu góðkennast, samstundis sum nevndin eisini viðger kærur um framd tvingsilsinntriv og ávísar avgerðir hjá myndugleikunum.

Tvingsilsnevndin viðger tilmæli um:
- Flyting uttan samtykki
- Ávaringar- og peilingarskipan
- Serlig upplatingarskipan til úthurð
- Halda persóni aftur og føra hann aftur
- Halda persóni føstum í sambandi við reinføri o.a.
- Nýtsla av hjálparráði
- Forða fyri atgongd til og eftirlit við nýtslu av internet og telefon
- Kanning av býli og ognarlutum
- Leggja hald á ognarlutir
- Læsa býli um náttina

## MÓTTIKIN MÁL

Í 2023 eru 33 mál innkomin til Tvingsilsnevndina, og snúðu øll málini seg um tilmæli til góðkenningar, meðan eingin kæra er móttikin. 2023 er triðja árið, har Tvingsilsnevndin virkar, og talið av móttiknum málum í 2023 er munandi hægri enn undanfarin ár. Býtið av móttiknum málum í 2023 er, at ein triðingur av móttiknu málunum eru tilmæli um framhaldandi nýtslu av inntrivi – endurgóðkenningar – meðan tveir triðingar av móttiknu málunum eru nýggj mál.




## MÓTTIKIN MÁL BÝTT Á ØKI

Niðanfyri eru málini, sum Tvingsilsnevndin hevur móttikið í 2023, býtt eftir hvat øki í tvingsilslógini tilmæli snýr seg um. Nógv tey flestu móttiknu tilmælini í 2023 snúðu seg um tilmæli sambært § 12 í tvingsilslógini um hjálparráð – tey vóru 20 í tali. Síðan vóru 10 tilmæli, sum snúðu seg um peilingar- og ávaringarskipanir í § 8 í tvingsilslógini. Restin av tilmælunum eru javnt smábýtt millum greinarnar §§ 11, 13, 14, 15 og 17 í tvingsilslógini. Talið av móttiknum tilmælum niðanfyri býtt á øki, er hægri enn talið av móttiknum málum, og hetta skyldast tað, at tað kemur fyri, at móttikin tilmæli frá myndugleikunum kunnu snúgva seg um nýtslu av fleiri ymiskum inntrivum í einum og sama máli.



## AVGREIDD MÁL

Tvingsilsnevndin hevði 14 fundir í 2023, har 31 mál vórðu avgreidd, meðan tvey mál vórðu tikin aftur av myndugleikanum.

Sum myndin niðanfyri vísir, so eru nógv tey flestu tilmælini, sum eru latin Tvingsilsnevndini í 2023, góðkend, og hetta er eisini í tráð við undanfarin ár. 27 av teimum 33 tilmælunum, sum vóru løgd fyri Tvingsilsnevndina í 2023, vórðu góðkend, meðan tvey tilmæli ikki vórðu góðkend, tvey vórðu partvís góðkend og tvey vórðu tikin aftur.




## MÓTTIKIN MÁL BÝTT Á MYNDUGLEIKA




Í 2023 eru móttikin munandi fleiri mál enn undanfarnu tvey árini. Býtið av myndugleikum, sum lata Tvingsilsnevndini tilmæli, er tó tað sama, har tað í høvuðsheitum er talan um tilmæli frá Almannaverkinum. Hesi telja 28 tilmæli í tali. Tórshavnar Kommuna hevur í 2023 latið Tvingsilsnevndini 4 tilmæli, meðan Økistænastan fyri Sandoyar sýslu hevur latið Tvingsilsnevndini eitt tilmæli í 2023.

# SERLIGA ÁHUGAVERT MÁL

Eitt serliga áhugavert tilmæli, úr rúgvuni, sum var lagt fyri Tvingsilsnevndina í 2023, varð ikki góðkent av Tvingsilsnevndini.

Málið snúði seg um tilmæli frá einum myndugleika um nýtslu av inntrivi sambært §§ 15 og 17 í tvingsilslógini. Greinarnar 15 og 17 í tvingsilslógini, eru partar av kapittul 4 í tvingsilslógini, sum snýr seg um inntriv móti persóni undir 18 ár.

Borgarin, sum tilmælið snúði seg um, var fevndur av persónsskaranum í § 1, stk. 3 í tvingsilslógini, og fyri hendan bólk av borgarum, er virkisøkið av tvingsilslógini avmarkað til einans at umfata § 17 og kapittul 6 í tvingsilslógini. Sambært serligu viðmerkingunum til § 1, stk. 3 í upprunauppskotinum til tvingsilslógina, er avmarkingin í mun til serliga persónsskaran í § 1, stk. 3 í tvingsilslógini, m.a. grundað á, at inntriv mótvegis persónum, sum eru fevndir av løgtingslógini um barnavernd, eru serliga skipað í løgtingslógini um barnavernd. Ásetingar um hesi inntriv eru serliga at finna í §§ 38 og 39 í løgtingslógini um barnavernd.

Inntriv sambært § 15 í tvingsilslógini, at halda persóni undir 18 ár aftur og føra hann aftur, fevna tískil ikki um persónar fevndir av § 1, stk. 3 í tvingsilslógini – altso persónar sum eru fevndir av persónsskaranum í løgtingslóg um barnavernd.

Tvingsilsnevndin góðtók tískil ikki tilmælið frá myndugleikanum um inntriv sambært § 15 í tvingsilslógini. Avgerðin var grundað á, at mett var, at borgarin var fevndur av persónsskaranum í § 1, stk. 3 í tvingsilslógini, og at fyri hendan bólkin av persónum er galdandi, at tað einans eru inntriv sambært § 17 og kapittul 6 í tvingsilslógini, sum eru viðkomandi. Virkisøkið í tvingsilslógini fyri hendan persónsskaran, er sostatt avmarkað til nøkur heilt ítøkilig inntriv, sbrt. § 1 stk. 3.

Tilmælið frá myndugleikanum, snúði seg eisini um inntriv sambært § 17, stk. 6 í tvingsilslógini. Talan er um áseting, har leiðslan í heilt serligum føri, kann taka fyribils avgerð um at seta inntriv sambært stk. 1 og 3 í verk, um mett verður, at inntrivið ikki kann bíða – t.e. inntriv um at forða fyri atgongd til og hava eftirlit við nýtsluni av internet og telefon hjá persóni undir 18 ár. Upplýst var í málinum, at leiðslan á stovninum, har borgarin búði, hevði mett talan vera um serligar umstøður, sum gjørdu, at inntrivið var sett í verk við fyribils avgerð sambært § 17, stk. 6 í tvingsilslógini. Hetta hevði ítøkiliga við sær, at talan í veruleikanum var um, at Tvingsilsnevndin skuldi gera ein eftirmeting av eini bráðfeingis avgerð, sum myndugleikin hevði sett í verk sambært § 17, stk. 6 í tvingsilslógini. Ásett er nevniliga í § 25 í tvingsilslógini, at myndugleikin skal skjótast gjørligt og í seinasta lagi 7 dagar eftir, at fyribils avgerð er tikin sambært §§ 17 og 20-23, leggja tilmæli fyri Føroya Kærustovn sambært § 24.

Tvingsilsnevndin vísti í avgerð síni á, at ásett er, at leiðslan kann í heilt serligum føri taka fyribils avgerð um at seta í verk inntriv sambært stk. 1 og 3, um mett verður, at inntrivið ikki kann bíða. Sambært serligu viðmerkingunum til § 17, stk. 6 í tvingsilslógini, er møguligt, um støðan verður mett bráðfeingis, at leiðslan í heilt serligum føri kann taka eina fyribils avgerð um at hava eftirlit við ella forða fyri atgongdini til internet ella telefon, t.d. kann bæði eftirlit og forðing setast í verk eftir hvørt annað innan stutta tíð í einari bráðfeingis støðu. Sum bráðfeingisstøða er ítøkiliga nevnt, at persónur við at nýta internet ella telefon, hóttir ella ger seg inn á annan persón og soleiðis setir heilsuna hjá hesum persóni í bráðfeingis vanda. Dømi í viðmerkingunum er sjálvsagt ikki úttømandi, men eyðsæð er, at talan skal vera um ein heilt bráðfeingis vanda fyri at seta heilsuna hjá persóni í ítøkiligan og ógvusligan vanda.

Soleiðis, sum myndugleikin lýsti málið fyri Tvingsilsnevndini, so metti nevndin ikki, at talan var um vanda fyri, at heilsan hjá persóni kom í bráðfeingis og ítøkiligan ógvusligan vanda fyri heilsuni, soleiðis sum hesin vandi er at skilja sambært § 17, stk. 6 í tvingsilslógini.

Tvingsilsnevndin vísti tó á, at greitt var, at soleiðis sum myndugleikin hevði lýst málið fyri Tvingsilsnevndini, so var talan møguliga um mál, har grundarlag var fyri inntrivum sambært § 17 í tvingsilslógini. Serliga kann hetta vera viðkomandi í mun til at tryggja tí unga borgaranum eina skilagóða døgnrytmu, soleiðis at ein vanligur gerandisdagur við t.d. skúla, arbeiði og øðrum kann tryggjast.

Mett var tó, undir øllum umstøðum, at soleiðis sum hetta málið var lýst fyri tvingsilsnevndini, so skuldi eitt tílíkt tilmæli frá myndugleikanum verið grundað á vanligu tilgongdina við frammanundan góðkenning frá Tvingsilsnevndini, og ikki setast í verk sum ein fyribils avgerð sambært § 17, stk. 6 í tvingsilslógini.

Tvingsilsnevndin góðkendi ikki tilmælið hjá myndugleikanum, at seta í verk inntriv sambært § 17, stk. 6 í tvingsilslógini við fyribils avgerð. Tvingsilsnevndin metti ikki, soleiðis sum málið var lýst fyri Tvingsilsnevndini, at grundarlag varð fyri at seta í verk inntrivini við fyribils avgerð.

## VIÐGERÐARTÍÐ

Miðal viðgerðartíðin í 2021 var knappar 23 dagar. Í málum hjá Tvingsilsnevndini eru oftast freistir ásettar í tvingsilslógini um, nær avgerð í seinasta lagi skal vera tikin. Hendan freistin er í flestu málum 30 dagar, meðan freistin í serligum málum kann vera 14 dagar. Ein miðal viðgerðartíð á 23 dagar er undir øllum umstøðum at meta sum nøktandi, og flestu málini eru viðgjørd innan ásettu freistirnar, um móttiknu tilmælini hava verið fullfíggjað og klár at viðgera.

Á HEIMASÍÐUNI HJÁ FØROYA KÆRUSTOVNI KANST TÚ LEITA EFTIR AVGERÐUM Á 8 YMISKUM MÁLSØKJUM.

EISINI BER TIL AT SÍGGJA NÆR FUNDUR VERÐUR OG LESA NÆRRI UM VIRKSEMIÐ Á STOVNINUM.

**WWW.FKS.FO**

FØROYA KÆRUSTOVNUR ER ÓHEFTUR STOVNUR
UNDIR LØGMÁLARÁÐNUM.

KJARNUUPPGÁVAN ER AT VIÐGERA KÆRUR UM
AVGERÐIR HJÁ ALMENNUM MYNDUGLEIKUM.

Føroya Kærustovnur · Undir Hornabakka · Postsmoga 45 · 110 Tórshavn
Tel. 32 05 85 · fks@fks.fo · www.fks.fo